# RÆTT TIL RÍKISBORGARARÆTT?



JAVNAÐARFLOKKURIN
á Fólkatingi

JAVNAÐARFLOKKURIN
á Fólkatingi

**2024**
Snið og umbróting: HDali · Rættlestur: Høgni Mohr · Prent og liðugtgerð: Føroyaprent

# INNIHALDSYVIRLIT


**FORORÐ** ..... 4
Útlendingar skulu hava rættvís kor – men samanhangsmegin í samfelagnum má ikki vikna ..... 4

**INNGANGUR OG NIÐURSTØÐUR** ..... 6

**FRÁ LINARI TIL STRANGA ÚTLENDINGALÓGGÁVU** ..... 10
Kjakið um tilflytarar og menningin á útlendingaøkinum í Danmark ..... 10
Nýggja áskoðanin um útlendingapolitikk í Danmark ..... 10
Ongin føroyskur ríkisborgararættur ..... 11
Case: Turi Géza Dávid ..... 12

**MANNAGONGDIR OG AVBJÓÐINGAR** ..... 14
Ríkisborgararættur við lóg ..... 14
Treytir ..... 14
Undantøk fyri umsøkjarar í Føroyum ..... 15
Serligar reglur fyri norðurlendskar borgarar ..... 16
Herdar reglur ..... 16
Dispensatión ..... 17
Ein skilagóð skipan? ..... 17
Ríkisborgararættarnevndin - persónligar áskoðanir og politisk rák ..... 19
Børn hava verri fortreytir ..... 20
Case: Ari Nandi ..... 22
Niðurstøða ..... 23

**ÚTLENDINGAPOLITIKKUR Í FØROYUM** ..... 24
Føroyska útlendingaøkið ..... 24
Útlendingaøkið og arbeiðsmarknaðurin ..... 29
Vinnulív ..... 33
Case: Janusz Kamola ..... 34
Manglandi arbeiðsmegi og økt vinnuvirksemi ..... 36
Búskapur ..... 37
Niðurstøða ..... 39

**SAMANUMTØKA OG TILMÆLI** ..... 40
Ríksborgararættur – ein rættur ella ei ..... 40
Tilmæli ..... 40

# FORORÐ

## Útlendingar skulu hava rættvís kor – men samanhangsmegin í samfelagnum má ikki vikna

Tá sagt verður, at arbeiðsloysið í Føroyum hevur verið metlágt farnu árini, gevur tað eina skeiva mynd. Tí arbeiðsloysi lýsir vanliga javnvágina millum eftirspurning og útboð av føroyskari arbeiðsmegi.

Veruleikin er, at eftirspurningurin er nógv størri enn innlendis útboðið. "Arbeiðsloysið" í Føroyum er í veruleikanum minus fleiri prosent. Tað eru útlendingar, sum farnu árini hava gjørt, at vit yvirhøvur hava havt eina javnvág.

Vit hava ongantíð áður verið í hesi støðuni. Men tað hava onnur lond. Fyri at nøkta tørvin hjá vinnulívinum hava tey latið hurðarnar upp á víðan vegg fyri útlendskari arbeiðsmegi.

Men at loysa ein trupulleika merkir ofta at skapa ein annan – ella fleiri aðrar.

Í fleiri grannalondum hava útlendingar í fyrstu atløgu verið grundarlag undir búskaparvøkstri og hava eisini gjørt samfeløgini meira fjølbroytt og spennandi. Men í longdini hevur verið trupult at fáa útlendingar í stórum tali at gerast partur av samfelagnum. Summastaðni er við tíðini komin ein sosial undirstætt av útlendingum, sum hava kent seg uttanfyri, og sum ikki hava tikið til sín landsins virði. Hetta hevur aftur ført til ófrið og lógloysi. Og tá reglurnar síðani eru herdar, eru púra ósek fólk ofta rakt.

Tað eru mong dømi um væleydnaða integratión – men tað eru eisini ræðandi dømi um, at hon er miseydnað. Tað ringasta dømið er Svøríki, sum eftir fáum áratíggjum er farið frá at vera tryggasta land í Evropa til at verða tað landið, har flest fólk doyggja at skotvápnum.

Læran er, at ótálmað tilflyting, har fokus bara er á tørvin hjá vinnuni á arbeiðsmegi her og nú, kann vera hættislig. Vit mugu altíð syrgja fyri, at fólk fáa góðar bústaðir, góð og trygg kor og greiðar reglur at halda seg til. Politiska skipanin hevur ikki bara ábyrgd av at tryggja fyritøkum atgongd til arbeiðsmegi, men eisini av at tryggja samanhangsmegina í samfelagnum. Og politikarar mugu ongantíð gloyma, at tey, sum skulu tryggja, at útlendingar falla til í samfelagnum, eru ikki politikararnir sjálvir, men vanlig fólk: Á arbeiðsplássum, í skúlum, í ítróttafeløgum, í samkomum og í grannaløgum. Verður uppgávan ov stór, tí talið av útlendingum er ov stórt, kann vandi vera á ferð.

Í londum har integratiónin ikki hevur eydnast, er tað gingið út yvir sosialu samanhangsmegina í samfelagnum. Tað hevur elvt til spenningar millum út-

lendingarnar og onnur; til paralellsamfeløg, ófrið og stórar politiskar rembingar. Brexit, Trump, AfD, SD, DF, Wilders, Le Pen eru rák, nøvn og flokkar, sum hava skakað politiska landslagið farnu árini, og sum øll eru sprottin burtur úr vreiði og ótta hjá veljarum fyri ótálmaðari tilflyting.

Hjá okkum er útlendingaøkið formliga danskt, men vit hava reelt ræði á tí mest avgerandi, tí danskir myndugleikar gera, sum vit vilja. Vit seta mørkini fyri, nær fólk kunnu fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum, og nær tey ikki kunnu. Hesar reglur eru heilt øðrvísi enn tær donsku. Eisini viðgerðin av umsóknunum fer í stóran mun fram í Føroyum, hóast avgerðirnar formliga skulu góðkennast í Danmark.

Men tá tað snýr seg um ríkisborgaraskap, eru somu reglur galdandi fyri alt ríkið. Og tað elvir, sum víst í hesi kanning, til stóra og væl skiljandi ørkymlan og misnøgd, tí reglurnar fyri hesum í Danmark eru millum tær strangastu í Evropa.

Tað, sum er hent, er, at Danmark orsakað av trýsti frá veljarunum hevur táttað reglurnar ógvuliga nógv. Trýstið er komið, tí Danmark hevur havt trupulleikar av ávísum tilflytarum, bæði fíggjarligar trupulleikar og trupulleikar av kriminaliteti.

Men Føroyar eru als ikki í somu støðu sum Danmark hesum viðvíkjandi. Vit hava ein annan veruleika og tí eisini ein annan tørv enn danir. Tann avbjóðing, danir vilja loysa við at tátta reglurnar meira og meira, finst ikki hjá okkum. Men vit – ella útlendingar í Føroyum og teirra børn – verða rakt av hesum politikkinum.

Orsøkin til, at eg havi latið hesa frágreiðing gera, er, at eg fái sera nógvar fyrispurningar frá fólki, ið eru fangað í eini skipan, sum er sera torskild og í mongum førum eisini bæði órímilig og órættvís. Eg havi tikið eina rúgvu av málum upp í politisku skipanini, og eg kenni tí alt til, hvussu órímilig hon er. Í summum førum hevur eydnast at loysa málini gjøgnum politiskar kanalir. Men tað er ikki rætti mátin. Hinvegin er sera frustrerandi ikki at kunnu hjálpa einum menniskja, bara tí reglurnar eru so stirvnar. Hetta menniskjað hevur jú uttan nakran iva moralska rættin á síni síðu.

Endamálið við hesum riti er tí eisini at skunda undir eina politiska viðgerð av hesum stórmáli.

Vit eru eitt lítið og viðbrekið land og skulu ikki gera somu álvarsomu mistøk, sum gjørd eru aðrastaðni, tá um tilflyting ræður. Politikarar hava ongan rætt til at leggja ov stórar byrðar á vanlig fólk, sum jú eru tey, ið skulu standa fyri integratiónini í gerandisdegnum. Men samstundis mugu vit hava eina skipan, sum tryggjar teimum, vit taka inn, rímilig og rættvís kor og rættindi.

Tey, sum hava arbeitt við frágreiðingini á skrivstovu Javnaðarfloksins á Fólkatingi, eru Pætur Jákupsson, Birgit Helena Dahl Hansen, Ragnar Sjúrðarson, Benny Lervig, Jóan Pauli Dahl Jakobsen og Sjúrður Skaale.

Sjúrður Skaale
*Fólkatingsmaður fyri Javnaðarflokkin*

# INNGANGUR OG NIÐURSTØ

Í 1990 vóru tað gott 500 persónar í Føroyum, sum ikki høvdu danskan ríkisborgararætt. Í dag er talið oman fyri 3.200. Sum partur av samlaðu fólkamongdini er talið á útlendingum sostatt vaksið úr góðum 1% upp í smá 6% seinastu 30 árini. Serliga seinastu 10 árini hevur tað gingið skjótt, og stóri fólkavøksturin í Føroyum í hesum tíðarskeiðnum er eisini í stóran mun borin av útlendingum, sum hava valt at flyta til Føroya. Seinasta uppgerðin hjá Hagstovuni vísir, at tveir triðingar av fólkavøkstrinum seinasta árið eru útlendingar.

Vaksandi talið av útlendingum í Føroyum endurspeglast eisini í vaksandi talinum av umsóknum um at gerast ríkisborgari í Føroyum. Tað merkir, at hóast nógvir tilflytarar koma hendan vegin í arbeiðsørindum og fara avstaðaftur, so ynskja onnur at gerast borgarar við somu rættindum og skyldum sum aðrir føroyingar. Hetta er galdandi fyri fólk, sum eru komin her til í arbeiðsørindum og síðani eru vorðin ein partur av samfelagnum, og sum ynskja at skapa eina tilveru í Føroyum. Og hetta er galdandi fyri tey, sum á ein ella annan hátt hava eitt familjuborið samband við onkran føroying. Hesi kunnu til dømis vera makar, børn og børn hjá útlendskum makum. Leiðin til eina tilveru sum borgari í Føroyum við somu rættindum og skyldum sum aðrir føroyingar gongur umvegis danska útlendingamálaráðið og fólkatingið. Tí einasti mátin at fáa hesi rættindi er við donskum ríkisborgararætti - ella við heimarætti, sum vit siga í Føroyum. Í ritinum brúka vit orðið ríkisborgararættur, tí vit vænta, at fleiri eru, ið skilja tað orðið við fyrsta eygnabrá.

Seinastu tíðina hevur Javnaðarflokkurin á Fólkatingi fingið fleiri áheitanir frá fólki, ið hava avbjóðingar at søkja um og fáa avgreitt mál um ríkisborgararætt. Tá vit kannaðu hesi mál, gjørdist greitt fyri okkum, at fleiri orsøkir eru at kasta politiskt ljós á ríkisborgararætt í Føroyum. Tað er øllum atkomuligt at síggja vaksandi talið av útlendingum í Føroyum á heimasíðuni hjá Hagstovuni, men tølini fyri hvussu nógvir av hesum útlendingunum ynskja at blíva føroyingar, og tí fara undir tilgongdina at fáa ríkisborgararætt, eru hinvegin ikki almenn. Tí hevur Sjúrður Skaale sum fólkatingsmaður gjøgnum ríkisborgararættarnevndina sett útlendinga- og integratiónsmálaráðharranum fleiri spurningar fyri at fáa fakta til vega. Sjúrður spurdi ráðharran í november í fjør, hvussu nógvar av umsóknunum á hvørjum ári frá 2002 til og við 2022 hava verið frá útlendingum við bústaði í Føroyum. Tað varð eisini spurt, hvussu nógv av hesum fingu góðkent teirra umsókn um ríkisborgararætt, hvussu nógv fingu noktandi svar, hvussu long miðal viðgerðartíðin var, hvussu nógv mál vóru, har viðgerðin vardi longur enn 22 mánaðir, sum er miðaltíðin, og hvussu nógvir umsøkjarar við bústaði í Føroyum fingu játtandi ella noktandi svar, hetta fyri hvørt ár frá 1981 til og við 2001, ið er árið, tá lógirnar um ríkisborgararætt byrjaðu at verða herdar.

Ráðharrin kundi tíverri ikki geva okkum innlit í tøl um ríkisborgararættarmál fyri persónar búsitandi í



ØÐUR

Føroyum áðrenn 2015. Grundgevingin var, at tey høvdu eina aðra telduskipan áðrenn 2015. Spurt varð eisini um, hvussu nógv børn undir 18 høvdu søkt um ríkisborgararætt, men av tí at børn ikki kunnu søkja sum sjálvstøðugir persónar kundi ella vildi ráðharrin heldur ikki svara tí spurninginum. Vit fingu kortini nøkur áhugaverd svar. Svarini váttaðu okkara varhuga av, at talið av útlendingum, ið vilja verða føroyingar, hevur verið og er støðugt hækkandi. Sum tað sæst í stabbanum niðanfyri, er talan um umleið eina tvífalding av umsóknum úr Føroyum innan heilt fá ár. Her eru nøkur av svarunum:






**Tabel 3. Den gennemsnitlige sagsbehandlingstid 2015-2022 for afgjorte sager for ansøgere, der på ansøgningstidspunktet havde bopæl på Færøerne**

| År | Gennemsnitlige sagsbehandlingstid - dage |
|---|---|
| 2015 | 495 dage |
| 2016 | 456 dage |
| 2017 | 530 dage |
| 2018 | 710 dage |
| 2019 | 697 dage |
| 2020 | 553 dage |
| 2021 | 534 dage |
| 2022 | 569 dage |
| **I alt for ansøgninger afgjort 2015-2022** | **566 dage** |

Ráðharrin svaraði eisini, at í oktober 2023 vóru 128 umsóknir um ríkisborgaraskap til viðgerðar, har umsøkjarin hevði bústað í Føroyum.

Fyri málini um ríkisborgaraskap, ið viðvíkja útlendingum í Føroyum og eru avgreidd millum 2015 og 2022, vóru tað 49 umsóknir, har málsviðgerðin vardi longur enn 22 mánaðir.

Skipanin, sum umsøkjarar við búðstaði í Føroyum skulu ígjøgnum, er bæði merkt av útlendingapolitikki í Danmark, sum ikki tekur atlit til føroysk viðurskifti, og vantandi vegleiðing til umsøkjarar í Føroyum. Hetta ger tað striltið og torskilt at søkja í Føroyum. Í stuttum er tilgongdin ikki nóg væl tillagað til umsøkjarar í Føroyum. Hava fólk ikki ríkisborgararætt, fylgja skyldur fyri at varðveita uppihaldsloyvi, men fá rættindi. Hesi fólkini hava ongan atkvøðurætt til val og mugu liva við dagligari óvissu um framtíðar uppihald í landinum. At fara uttanlands kann hava neiligar avleiðingar fyri málsviðgerðina, eisini hóast



ferðingin er í sambandi við arbeiði. Tey kunnu ikki fáa ávís størv innan eitt nú uttanríkistænastu og almenna fyrisiting. Heldur ikki sleppa tey at arbeiða uttanlands longur enn 6 mánaðir. Fær mann barn, fær barnið ikki ríkisborgararætt uttan so, at annað av foreldrunum er danskur ríkisborgari. Í skrivandi stund er málsviðgerðin um ríkisborgaraskap hjá fleiri umsøkjarum áleið 22 mánaðir.

Tað eru góðar grundir til, og tað er eisini púra vanligt, at útlendingar ikki hava somu rættindi sum ríkisborgarar, eitt nú valrætt. Tó eru minni góðar grundir til, at sjálv tilgongdin er so fløkjaslig, at umsøkjarar ofta ikki skilja reglurnar. Tað er júst hendan fløkta tilgongdin, sum er snúningsdepil í hesari frágreiðing.

Politiska evnið um ríkisborgararætt hongur eisini óloysiliga saman við útlendingapolitikki í breiðari høpi. Útlendingapolitikkur er sum heild heldur ikki nógv viðgjørdur í Føroyum, hóast evnið er háaktuelt, nú talið av útlendingum í Føroyum longu er størri, enn tað nakrantíð hevur verið. At so nógv fólk koma hendan vegin, er eitt árin av øktum eftirspurningi eftir útlendskari arbeiðsmegi, sum stendst av øktum vinnuvirksemi og búskaparvøkstri seinastu árini. Í seinnu helvt av frágreiðingini lýsa vit, hvussu Føroyar áður hava handfarið málið um útlendingapolitikk. Flestu viðgerðir eru endaðar, uttan at stórar broytingar eru spurdar burturúr. Niðurstøðan hevur oftast verið, at Føroyar ikki eru til reiðar at taka ímóti flóttum ella at fremja yvirtøkur á útlendingaøkinum. Vit fara síðan í dýpdina og viðgera, hvørja ávirkan útlendsk arbeiðsmegi hevur á føroyska samfelagið og búskapin. Vit vísa á, at tað kann vera skilagott at innflyta arbeiðsmegi fyribils, tá arbeiðsloysið er lágt. Samstundis mugu politisk tiltøk setast í verk fyri at gagnnýta virðið, sum útlendingar kunnu hava fyri Føroyar í framtíðini.

Frágreiðingin er skipað soleiðis - fyrst vísa vit á, hvussu politiski orðadrátturin og útlendingapolitiska linjan í Danmark er farin frá at vera lin til at vera nakað nógv strangari. Vit viðgera søguligar orsøkir til tess. Síðani greiða vit frá, hví hetta er avgerandi fyri tey, ið søkja um ríkisborgararætt í Føroyum. So greiða vit yvirskipað frá mannagongdini at søkja um ríkisborgararætt, har vit leypandi peika á ymsar avbjóðingar við mannagongdini fyri umsøkjarar og stovnar í Føroyum. Eftirfylgjandi lýsa vit yvirskipað týdningin av tilflyting fyri demografisku menningina, vinnu og búskap í Føroyum. At enda leggja vit fram tilmælir um ábøtur upp á verandi skipanir, sum viðgjørdar eru í frágreiðingini.



# FRÁ LINARI TIL STRANGA

## Kjakið um tilflytarar og menningin á útlendingaøkinum í Danmark

Í 1960`unum og 1970`unum kom fyrsti stóri streymurin av útlendingum til Danmarkar í nýggjari tíð. Talan var um tilflytarar, ið serliga komu frá táverandi Jugoslavia, Turkalandi, Pakistan og partvíst Marokko. Teir fingu heiti "gestaarbeiðarar" og vóru móttiknir við tí endamáli at bøta um holini á tí gløðandi danska arbeiðsmarknaðinum. Tað var danska vinnulívið, ið tók stig til at bjóða flestu gestaarbeiðarunum til landið. Tá marknaðurin vendist, og tørvurin á arbeiðsmegi minkaði, avgjørdi danska stjórnin at fremja eitt sokallað "tilflytarastopp". Partar av vinnulívinum vóru ímóti hesum, tí tey vóru bangin fyri, at tey ikki longur kundu fáa góða og bíliga arbeiðsmegi. Vinnulívið megnaði at syrgja fyri, at teir gestaarbeiðararnir, ið høvdu arbeiðsloyvi í Danmark, kundu verða verandi, og fáa familju sína til Danmarkar. Harvið var grundarsteinurin lagdur fyri, at gestaarbeiðarar blivu tilflytarar og síðani danskir ríkisborgarar.

Frá at hava verið eitt kjak um tíðaravmarkaða arbeiðsmegi og tess leiklut á danska arbeiðsmarknaðinum fór kjakið við tíðini at snúgva seg um friðskjól, flóttafólkapolitikk, familjusamanføring, búsetingarmynstur og mentanarmunir. Hetta hekk saman við, at talið av flóttum hækkaði nógv orsakað av borgarakrígnum í Sri Lanka, krígnum millum Iran og Irak og borgarakrígnum í Libanon. Í 1983 setti borgarliga "firkløverregeringen" undir leiðslu av Poul Schlüter í verk eina umstrídda útlendingalóg. Lógin varð rópt hin mest liberala í Evropa og varð samtykt við einum sera smølum meiriluta. Nýggja útlendingalógin legði lunnar undir tann útlendingaorðadrátt, sum er minst líka viðkomandi og umstríddur enn tann dag í dag.

## Nýggja áskoðanin um útlendingapolitikk í Danmark

Í 00`unum kúvendist politiska linjan í útlendingapolitikkinum. Heitasta evnið í donskum politikki síðan aldarskiftið hevur uttan iva verið útlendingapolitikkurin. Til øll fólkatings- evropaparlaments- og kommunuvalini í Danmark síðan aldarskiftið hevur kjakið um útlendingar verið millum tey ovastu á dagskránni. Ofta verður hetta kjakið sett í samband við altjóða hendingar, bæði tí at kríggj úti í heiminum ávirkar flóttafólkastreymin í okkara parti av heiminum, men eisini tí at hendingar sum yvirgangsálopið í USA 11. september 2001 eru avgerandi fyri, hvussu hugsað verður um ávísar mentanir, trúarbólkar og tilflytingina í okkara parti av heiminum.

Til fólkatingsvalið í november 2001, altso stutt eftir yvirgangsálopið hin 11. september, var spurningurin um tilflytarar ovast á breddanum. So at siga allir flokkar kjakaðust um tilflyting, islam, yvirgang, familjusamanføring, integratión og grundleggjandi munirnar á ikki-vesturlendskum og vesturlendskum mentanum. Flestu flokkarnir tóku undir við, at

# ÚTLENDINGALÓGGÁVU

lógirnar á tilflytingarøkinum vórðu herdar. Eftir valið tók táverandi formaðurin í Vinstra, Anders Fogh Rasmussen, við stjórnarvaldinum saman við teimum konservativu. Við stuðli frá Danska Fólkaflokkinum framdi stjórnin risastórar herðingar í danska útlendingapolitikkinum. Høvuðsmálini hjá stjórnini vóru at avmarka tilflytingina og samstundis betra um integratiónina hjá teimum, ið longu høvdu fast uppihald í Danmark. Tey borgaligu høvdu meirilutan upp gjøgnum øll 00`ini, og sum stjórnarflokkarnir saman við Danska Fólkaflokkinum høvdu lovað, bleiv tað munandi truplari at fáa friðskjól, ríkisborgararætt og familjusameining í Danmark og harvið eisini í Føroyum[1].

Skiftandi útlendingapolitiska rákið er dømi um, hvussu fatanin av ríkisborgaraskapi er kúvend. Áðrenn aldarskifið tóktist politiska áskoðanin at vera tann, at tað var skynsamt at veita teimum ríkisborgararætt, sum høvdu búð og arbeitt leingi í landinum, hetta sum part av integratiónini. Seinastu 20 árini hava politikarar hert reglurnar fleiri ferðir, og donsku reglurnar eru í dag millum tær strangastu í øllum Evropa[2]. Í 2015 segði táverandi integratiónsmálaráðharrin, Inger Støjberg, í sambandi við ríkisborgararættaravtaluna, at stjórnin vildi gera tað munandi verri at fáa danskan ríkisborgararætt. Støjberg segði eisini, at:

> ***"Tað er ongin mannarættur at blíva ríkisborgari. Tað er nakað, mann má rætta hondina út eftir. Tað má gjarna vera eitt petti, mann skal rætta hondina út."***

Hetta vísir, hvussu áskoðanin um ríkisborgararætt er broytt. Ríkisborgararættur verður ikki longur sæddur sum ein natúrligur partur og ein fortreyt fyri integratión, men sum lønin ein fær eftir at hava víst sítt virði fyri statin.

# Ongin føroyskur ríkisborgararættur

Sum skilst omanfyri eru ymiskar orsøkir til broytingina frá linum til strangari útlendingapolitikk í Danmark. Felags fyri broytingarnar er, at tær eru myndaðar av viðurskiftum í Danmark uttan atlit til støðuna ella tørvin í Føroyum. Orsøkin til, at politiska kjakið og menningin í Danmark hevur týdning, er, at ríkisborgararættur er danskt málsøki. Um ein útlendingur vil sleppa at kalla seg føroying, so má hann fáa loyvi frá danska fólkatinginum. Sambært grundlógini kann ein útlendingur bara fáa ríkisborgararætt við lóg. Ríkisborgararættur er ein av teimum 5 málsøkjunum, sum Føroyar ikki kunnu yvirtaka sambært yvirtøkulógini. Sostatt eru politisku streymarnir í Danmark púra avgerandi fyri útlitini hjá útlendingum í Føroyum at fáa ríkisborgararætt. Niðanfyri greiða vit ítøkiliga frá, hvussu ein útlendingur útvegar sær ríkisborgaraskap í Føroyum. Við øðrum orðum kanna vit reglur og mannagongdir, sum tær eru nú. Leypandi fyrihalda vit okkum eisini til avbjóðingar í hesum sambandi.

---

1 *https://faktalink-dk.translate.goog/titelliste/den-danske-indvandrerdebat?_x_tr_sl=da&_x_tr_tl=en&_x_tr_hl=en&_x_tr_pto=sc*
2 *https://www.information.dk/2006/02/eus-skrappeste-statsborgerskabsregler*

# CASE: TURI GÉZA DÁVID

22 ára gamli Turi Géza Dávid er úr Ungarn, men flutti saman við familjuni til Føroya, tá hann var fýra og eitt hálvt ára gamal. Í dag er Géza 22 ár og hevur sostatt búð í Føroyum í 18 ár. Hóast hann hevur búð í Føroyum nógv størsta partin av lívi sínum, gingið í barnagarði, fólkaskúla og miðnámskúla, arbeitt og rindað skatt her, og hann talar flótandi føroyskt uttan dialekt, er hann kortini ikki føroyingur á pappírinum.

> ***Eg eri úr einari lítlari bygd beint uttan fyri Budapest í Ungarn. Vit fluttu, tí pápi mín fekk møguleika at koma til Føroya at spæla fótbólt. Øll familjan treivst so mikið væl her, at tað gekk ikki long tíð, til vit gjørdu av at flyta til Føroya. Eg havi havt ein púra vanligan føroyskan uppvøkstur. Tá vit komu til Føroya, fór eg beint í barnagarð, síðan fór eg í skúla í Gøtu og Leirvík, og eftir tað fór eg á Miðnám á Kambsdali. Í dag arbeiði eg og spæli fótbólt.***

Júst hetta við fótbóltinum er ein trupulleiki hjá Géza. Hann er ikki vorðin føroyingur í passinum, og tað forðar dreymi hansara, sum er at sleppa út um landoddarnar at royna seg sum yrkisleikara.

> ***Eg kann væl fara av landinum, men so má tilgongdin hjá mær at blíva føroyingur byrja av nýggjum. Eg havi longu bíðað í fýra ár, og eg verði ikki yngri við árunum, sum ger tað truplari at sleppa uttanlands. Eg havi fingið nøkur góð tilboð, sum eg havi verið noyddur at takkað nei til, hóast eg hevði viljað farið avstað.***

## Vil fyrst og fremst blíva føroyingur

Hóast Géza alt lív sítt hevur droymt um at blíva yrkisleikari uttanlands, so er tað eittans ynski, ið hevur hægri raðfesting fyri 22 ára gamla gøtumannin.

> ***Eg vil fyrst og fremst blíva føroyingur, so eg kann umboða føroyska landsliðið. Tað er dreymurin. Fótbóltssamband Føroya (FSF) søkti um ríkisborgararætt fyri meg, tá eg júst var blivin 18 við tí vón, at eg kundi blíva føroyingur og spæla fyri U21-landsliðið. Upprunaliga var ætlanin ikki at søkja, tí eg visti, hvussu drúgv hendan tilgongdin er, men FSF hevur hjálpt mær við øllum tí praktiska.***

## Vónar at koma á næsta lógaruppskotið um ríkisborgararætt

Géza hevur bíðað nú í fýra ár uttan at hava sæð ljós fyri endan av tunlinum, men tá hann verður spurdur, um hann hevur frætt nakað aftur frá danska útlendingastýrinum, brýtur hann spentur spurningin av og fortelur um eitt bræv, hann fekk í oktober 2023.

> ***Í oktober fekk eg eitt bræv frá danska útlendingastýrinum, har tey bóðu um allar hugsandi upplýsingar um míni seinastu 4 ár. Eg skuldi skriva, hvar eg hevði arbeitt, spælt fótbólt og gingið í skúla, hvørji míni próvtøl vóru, og hvussu nógv eg hevði tjent. Nú bíði eg spentur til at fáa svar í mars, tí sum eg havi skilt tað, vóru hetta teir seinastu upplýsingarnir, ið skuldu latast, áðrenn eg kann blíva føroyingur.***

## Seinastu fýra árini hava verið dýr

Geza hugsar mangan um ta yrkisleiðina, hann hevði kunnað havt, hevði tilgongdin ikki verið so drúgv.

> ***Eg havi sum sagt næstan búð í Føroyum í 19 ár. Eg havi verið her so at siga alt mítt lív og føli meg sum føroying. Tí hevði eg ynskt, at eg kundi søkt, tá eg var 18 og fingið passið innan eitt ár ístaðin fyri at bíða í fýra og møguliga fleiri ár. Hetta hevði gjørt lív mítt munandi lættari. Hevði eg fingið passið, tá eg var 18-19 ára gamal, hevði eg mest sannlíkt spælt uttanlands nú. Og hevði tað gingið væl, var eg komin longri, enn eg eri í dag. Hetta hevur forðað einum stórum parti av lívi og dreymum mínum. Ein má hava í huga, at fótbóltsyrkisleiðin er stutt, og fýra ár eru longu tikin frá mær. Um eg eri heppin, eigi eg í mesta lagi 10 ár eftir sum fótbóltsspælari uttanlands á høgum stigi.***


PRG

# MANNAGONGDIR OG AVBJ

## Ríkisborgararættur við lóg

Ríkisborgararættur við lóg (Indfødsret ved naturalisation) er grundaður á grein 44 í donsku grundlógini, sum sigur, at "ingen udlænding kan få indfødsret uden ved lov". Lógin er ein listi við nøvnum og bústaði hjá borgarum, sum við lógini fáa ríkisborgararætt. Listin við persónum er almennur, og tí kann einhvør síggja, hvør verður danskur ríkisborgari. Fólkatingið viðger og samtykkir lógaruppskot um ríkisborgararætt tvær ferðir árliga. Viðgerðin tekur áleið tríggjar mánaðir. Eftir fyrstu viðgerð verður uppskotið beint í ríkisborgararættarnevndini (Indfødsretsudvalget). Síðani fer lógaruppskotið til aðru og triðju viðgerð. Áðrenn endaligu samtyktina av lógaruppskotinum kunnu einstaklingar takast av listanum. Hetta kann henda, um ein umsøkjari ikki longur lýkur treytirnar, til dømis um umsøkjarin hevur framt brotsverk ella er komin í skuld til tað almenna. Treytirnar skulu altso lúkast, sjálvt um mann hevur fingið váttandi svar upp á umsóknina, og tær skulu lúkast heilt, til lógaruppskotið er samtykt. Tá lógaruppskotið er samtykt við triðju viðgerð, eru umsøkjarar úr Føroyum endaliga vorðnir ríkisborgarar.

Lógaruppskotini verða vanliga samtykt við breiðum meiriluta. Tað er einans Danski Fólkaflokkurin, ið støðugt atkvøður ímóti uppskotunum um ríkisborgararætt av prinsipiellum orsøkum. Nøkur fá atkvøða blankt, og restin atkvøður fyri. Í seinasta uppskotinum, sum varð endaliga samtykt 19. desember 2023, vóru tað 2.339 fólk, ið fingu danskan ríkisborgararætt. Av teimum vóru 19 føroyingar.

## Treytir

Tað eru fleiri treytir fyri at fáa danskan ríkisborgararætt. Allar treytirnar skulu lúkast fram til, at lógaruppskotið endaliga er samtykt.

Fyrst eru treytir viðvíkjandi bústaði og uppihaldi. Taka vit útgangsstøði í, at umsøkjarin býr í Føroyum, skal viðkomandi hava havt fastan bústað í Føroyum, havt permanent uppihaldsloyvi í Føroyum í tvey ár og hava uppihildið seg í ríkisfelagsskapinum lógliga og óavbrotið seinastu níggju árini. Uttanlandsferðir gera ikki, at hetta tíðarskeiðið verður mett sum avbrotið. Tó skal ein upplýsa um ávísar ferðir, m.a. allar uttanlandsferðir, sum hava vart longur enn fýra vikur.

Harafturat eru treytir viðvíkjandi arbeiði og fíggjarligum viðurskiftum. Tað er ein treyt, at ein fær uppihildið sær sjálvum fíggjarliga. Hetta merkir, at ein ikki skal hava fingið stuðul frá tí almenna seinastu tvey árini, og at viðkomandi seinastu fimm árini ikki hevur móttikið stuðul frá tí almenna í eitt samanlagt tíðarskeið, sum er longur enn fýra mánaðir. Ein kann heldur ikki standa í skuld til tað almenna, ið er fallin til gjaldingar. Hetta fevnir um skatt, bøtur v.m.

Umsøkjarin skal eisini vera knýttur at arbeiðsmarknaðinum. Sum útgangsstøði er treytin, at umsøkjarin er í vanligum fulltíðararbeiði í Føroyum, t.e. miðalarbeiðstíð á 30 tímar um vikuna í 3 og eitt hálvt ár tey seinastu 4 árini. Harafturat skal umsøkjarin vera knýttur at arbeiðsmarknaðinum, tá søkt verður um ríkisborgararætt.

Nakrir politikarar hava funnist at treytunum um at vera førur fyri at forsyrgja sær sjálvum. Táverandi framsøgufólk í ríkisborgararættarmálum fyri Radikale Venstre, Simon Emil Ammitzbøl, segði seg stúra fyri hesum í sambandi við ríkisborgararættaravtaluna í 2005. Hann segði tað svara til, at borgarlig rættindi hjá einum verða tengd at, hvussu nógv mann for-

[3] *https://www.information.dk/2006/02/eus-skrappeste-statsborgerskabsregler*

vinnur. Í gomlum døgum tók mann atvøðurættin frá fólki, ið skyldaðu statinum pengar, og hesar treytir eru eitt fet skeivan veg[3].

At enda eru treytir um lógarbrot. Hetta fevnir um treytaðan og ótreytaðan dóm, bót, skuldseting, ákæru og ávaring, bæði innan og uttan fyri ríkisfelagsskapin. Treytin fevnir um brot á allar lógir, eitt nú revsilóg, ferðslulóg og útlendingalóg. Fær ein útlendingur fongsulsrevsing, hevur tað ta avleiðing, at viðkomandi ikki fær loyvi at sleppa á lógaruppskotið um ríkisborgararætt. Viðvíkjandi bótarevsing kann ein ikki gerast danskur ríkisborgari, fyrr enn ein ásett revsingartíð er liðug. Til dømis er revsingarskeiðið fyri bøtur yvir 3000 krónur 4 og eitt hálvt ár. Umsøkjarin noyðist altso at bíða 4 og eitt hálvt ár afturat.

Treytin um, at umsøkjarin skal upplýsa øll misbrot og møgulig misbrot hevur verið fyri atfinningum fyri ikki at samsvara við meginregluna um sjálvsinkriminering, sum staðfestir, at ein ákærdur hevur rætt til ikki at úttala seg[4].

# Undantøk fyri umsøkjarar í Føroyum

At kalla somu krøv og treytir eru galdandi fyri umsøkjarar við bústaði í Føroyum, sum tað eru fyri umsøkjarar við bústaði í Danmark. Tó eru trý undantøk. Tey eru sonevnda ríkisborgararættarroyndin, grundlógarhald og krav um dansktkunnleikar.

Til ríkisborgararættarroyndina skal umsøkjarin svara 45 spurningum um danska mentan, danskan politikk og danska søgu. Harav skulu 36 vera rættir. Umsøkjarar í Føroyum sleppa undan hesi royndini. Grundlógarhaldini verða hildin í teimum 98 donsku kommununum, har borgarstjórarnir í kommunum skulu taka í hondina á nýggju ríkisborgarunum og handa teimum fráboðanina um ríkisborgaraskap. Hesi haldini eru ikki í føroyskum kommunum, og tað verður ikki kravt, at umsøkjarar við bústaði í Føroyum luttaka. Hesi skulu heldur ikki viðhefta skjalprógv fyri førleikar í donskum máli. Fyri umsøkjarar í Danmark verður kravt, at tey hava staðið fak og roynd í donskum. Hóast borgarar við bústaði í Føroyum eru undantiknir frá hesi treyt, er ein onnur treyt ístaðin. Umsøkjararnir skulu prógva sínar førleikar í føroyskum máli.

Treytin um føroyskar málkunnleikar hevur við sær, at umsøkjarin skal venda sær til Føroya Politi, sum skal meta um málførleikarnar hjá viðkomandi. Umsøkjarin skal megna at hava eina samrøðu á føroyskum uttan at brúka umskrivingar ella onnur mál, og hetta við natúrligari dialekt. Hendan samrøðan gongur fyri seg á eini løgreglustøð, og tað er løgreglufólkið, ið metir, um viðkomandi hevur neyðugu førleikarnar í føroyskum. Tað er hendan metiningin, sum verður brúkt sum skjalprógv fyri málkunnleikar, og sostatt ikki miðnámsprógv ella próvtøka í føroyskum.

Tað, at orðingin í treytini um føroysktkunnleikar er so lítið ítøkilig og ikki byggir á uttanveltaðar grundreglur, kann gera tað trupult hjá umsøkjarum at gjøgnumskoða júst, hvat verður kravt av teimum, og hvussu ein skal fyrireika seg. Harafturat er løgreglan ikki ein stovnur, sum vanliga arbeiðir við ella hevur hevur serkunnleika í málførleikum. Av hesi orsøk er tað trupult at siga, hvør fær váttan fyri málførleikar, og hvør ikki fær, samstundis sum tað er ivasamt, hvat málførleikarnir fevna um. Rættartrygdin hjá tí einstaka er sostatt óviss.

[4] *https://uim.dk/statsborgerskab/udenlandske-statsborgere/betingelser/ophold/*



# Serligar reglur fyri norðurlendskar borgarar

Norðurlendskir ríkisborgarar hava møguleika at fáa ríkisborgararætt við eini smidligari tilgongd enn við lóg. Tað kallast ríkisborgararættur við fráboðan (erklæring). Tað er ríkisumboðsmaðurin í Føroyum, sum umsitur hetta økið. Umsóknir um ríkisborgararætt við fráboðan kunnu sendast til ríkisumboðið við at útfylla eitt umsóknarskjal, sum er at finna á heimasíðuni hjá ríkisumboðnum, ella við at venda sær til ríkisumboðið í upplatingartíðini ella eftir avtalu. Kostnaðurin er 1.100 krónur. Bíðitíðin veldst um, hvørji skjøl ein letur inn, hvussu nógv er at gera og ymisk onnur viðurskifti. Tó er tilgongdin vanliga skjótari, enn tá talan er um ríkisborgararætt við lóg.

Í mun til treytir og tilgongd er tað nógv einfaldari hjá norðurlendingum at fáa ríkisborgararætt við fráboðan, enn tað er hjá teimum, sum skulu umvegis fólkatingið.

Fyri tey, sum eru yvir 18 ár, eru treytirnar, at tey hava fingið norðurlendskan ríkisborgararætt (tó ikki við lóg), at tey hava havt bústað í ríkinum seinastu 7 árini, og at tey ikki eru dømd fyri lógarbrot. Fyri tey, ið eru fylt 18, men sum eru undir 23 ára gomul, eru treytirnar, at tey hava bústað í ríkinum fráboðanartíðspunktið og hava búð í landinum í minst 10 ár - og av hesum samanlagt minst fimm ár seinastu seks árini. Harafturat skulu tey hvørgan vera dømd ella skuldsett fyri lógarbrot[5].

Hevur tann, ið søkir um ríkisborgararætt við fráboðan, børn, fáa børnini ríkisborgararætt saman við foreldrinum. Tað krevur, at barnið hevur bústað í ríkinum, er undir 18 ár, og at foreldrið hevur galdandi foreldramyndugleika.

## Herdar reglur

Fram til 2003 kundu øll børn undir 18 fáa ríkisborgararætt við fráboðan. Tó blivu reglurnar strangari í 2004, tá stjórnin, ið varð skipað í 2001 (Vinstri og Konservativi Fólkaflokkurin), samtykti broytingar í ríkisborgararættarlógini við 61 atkvøðum fyri og 50 ímóti. Hesar broytingar høvdu við sær, at tað bleiv skilt ímillum norðurlendskar ríkisborgarar og aðrar ríkisborgarar. Norðurlendskir ríkisborgarar varðveittu hesa lagaligaru skipanina, meðan aðrir ríkisborgarar mistu rættin, at søkja um ríkisborgararætt við fráboðan.

Í viðmerkingunum til lógarbroytingina í 2004 umrøddi stjórnin, hvussu lógarbroytingin ikki var eitt brot á altjóða sáttmálar, ið Danmark hevur bundið seg til - eitt nú evropeiski sáttmálan um ríkisborgararætt (ESR). Sáttmálin áleggur londum at betra um atgongdina til ríkisborgaraskap fyri tey, ið eru fødd í landinum ella hava uppihildið seg í landinum í eitt ávíst tíðarskeið, áðrenn tey eru fylt 18 ár. Stjórnin vísti á, at ESR ikki setti krøv til júst, hvussu hendan lagaligari atgongdin skuldi fara fram, og hon metti tað ikki vera neyðugt at gera nýggjar lagaligari treytir. Viðvíkjandi mismuni á norðurlendskum og útlendskum ríkisborgarum vísti stjórnin á, at ESR forbjóðar mismuni orsakað av tjóðskapi, etniskum uppruna o.ø., men nevnir ikki ríkisborgararætt. Hó-

[5] *https://www.rigsombudsmanden.fo/sagsomraader/indfoedsret/statsborgerskab-ved-erklaering/?fbclid=IwAR3RznTWRNiR_ZIrQGyJkvdYAyxYLwPkDxLw2TvuDz3BK0MAvnEH3Dwe4kk*

ast ESR ikki nevnir ríkisborgararætt, er Danmark bundið at øðrum altjóða sáttmálum, sum staðfesta, at tað er brot á eitt nú evropeiska mannarættindasáttmálan at gera mismun orsakað av ríkisborgararætti[6].

Danmark er tað einasta landið, sum ger mun á norðurlendskum og ikki-norðurlendskum borgarum á hesum økinum. Í øllum øðrum norðurlondum eru treytirnar fyri at fáa ríkisborgararætt við fráboðan tær somu fyri øll ung óansæð tjóðaruppruna. Harafturat kunnu børn sjálvstøðugt søkja um ríkisborgararætt í Norra og Svøríki. Ómyndug kunnu ikki søkja sjálvstøðugt í Danmark.

Av tí at reglugerðin verður smíðað av danska lóggávuvaldinum, er hesin reglufasti mismunurin á børnum í mun til fráboðanina eisini galdandi í Føroyum, her vit gera mun á útlendskum børnum í mun til tjóðaruppruna. Bert norðurlendsk børn kunnu fáa ríkisborgararætt við fráboðan, meðan leiðin hjá øllum øðrum er munandi stirvnari og truplari.

# Dispensatión

Um ein umsøkjari ikki lýkur eina ella fleiri treytir, sum eru lýstar omanfyri, ber til at søkja um dispensatión. Einstøku lagnurnar hjá teimum, ið hava søkt um dispensatión, verða avgjørdar í fólkatingsins ríkisborgararættarnevnd. Í ríkisborgararættarnevndini eru 17 limir. Meirilutin í nevndini ger av, hvør kann fáa danskan ríkisborgararætt, hóast viðkomandi ikki lýkur løgfrøðiligu krøvunum. Føroysku fólkatingslimirnir eru ikki umboðaðir í nevndini, hóast nevndin avgerð, hvør umsøkjari í Føroyum fær ríkisborgararætt.

Munurin á dispensatión og undantaki er, at treytirnar als ikki eru galdandi, tá talan er um undantøk. Viðvíkjandi dispensatión er tað harafturímóti soleiðis, at serligar umstøður skulu gera seg galdandi fyri at fáa undantakslovyi. Tað vil siga, at tað ikki er neyðugt at søkja um at vera undantikin frá treytini um dansktførleikar, av tí at hetta longu er eitt undantak. Tað er heldur ikki neyðugt at søkja um at verða undantikin frá ríkisborgararættarroyndini og grundlógarhaldinum. Harafturímóti er tað neyðugt at søkja um undantaksloyvi frá treytunum um m.a. tilknýti til arbeiðsmarknaðin ella uppihaldsloyvi.

Veit umsøkjarin frammanundan, at viðkomandi ikki livir upp til treytirnar, kann hann søkja um dispensatión, samstundis sum søkt verður um ríkisborgararætt. Tá sendir útlendinga- og integratiónsmálaráðharrin dispensatiónsmálið víðari til ríkisborgararættarnevndina. Hevur umsøkjarin fingið noktandi svar upp á ríkisborgararættarumsóknina, kann hann eisini søkja um dispensatión. Hetta fer fram við, at umsøkjarin sjálvur vendir sær til ein ella fleiri limir í ríkisborgararættarnevndini, ella við at umsøkjarin fær ein fólkatingslim at venda sær til nevndina vegna viðkomandi. Tað, at limirnir vátta at taka dispensatiónsmálið upp, merkir ikki, at viðkomandi fær dispensatión. Tað krevur undir øllum umstøðum, at ein meiriluti í nevndini atkvøður fyri.

Tað ber til at søkja um dispensatión, um umsøkjarin er kropsliga ella sálarliga sjúkur. Sum skjalprógv skal ein lækni orða og undirskriva eina læknaváttan. Myndugleikarnir seta strong krøv til neyvleikan í orðingini í læknaváttanini. Váttanin má ikki vera eldri enn tvey ár og skal lýsa greitt, hví sjúkan forðar einum í at liva upp til treytina.

Tað eru ongi formkrøv til umsóknina, men tað verður mælt til at senda umsóknir um dispensatión gjøgnum frymilin á fólkatingsheimasíðuni ft.dk undir udvalgs- indfødsretsudvalget.

Sí https://www.ft.dk/da/udvalg/udvalgene/ifu/kontakt.

## Ein skilagóð skipan?

Frá 2011 til 2015 hevur ríkisborgararættarnevndin váttað ein meiriluta av dispensatiónsumsóknum. Í 2014 fingu heili 98,5% váttandi svar upp á dispensatiónsumsóknina og kundu tí gerast danskir ríkisborgarar, hóast tey høvdu brek ella vóru sjúk, meðan tað í 2020 vóru bert 2,3%, sum fingu váttandi svar. Hetta vísa tøl frá útlendinga- og integratiónsmálaráðnum[7].

[6] *https://menneskeret.dk/sites/menneskeret.dk/files/media/document/Statsborgerskab_Fremmed%20i%20eget%20land.pdf*
[7] *https://www.dr.dk/nyheder/indland/fra-98-til-2-procent-naesten-ingen-handicappede-faar-dispensation-til*

Mannagongdirnar hjá ríkisborgararættarnevndini viðvíkjandi dispensatiónsmálum hava verið fyri atfinningum í donskum miðlum. Eitt nú hava fleiri felagsskapir, ið arbeiða fyri rættindum hjá teimum, sum bera brek funnist at skipanini. Tey vísa á, at hóast rætturin til dispensatión finst í reglunum, so vísa tølini, at tað í veruleikanum er nærum ógjørligt at fáa dispensatión[8]. Tað merkir, at tey, ið eru sjúk ella bera brek, í veruleikanum ikki hava nakran rætt at gerast ríkisborgarar.

Møguleikin fyri at fáa dispensatión finst ikki bara í donskum reglum um ríkisborgararætt. Tað er eisini ein rættur sambært ST altjóðasáttmálanum um rættindini teirra, ið bera brek, sum er ein partur av mannarættindunum.

Hóast grundlógin er hægsta lóg í danska ríkinum, er Danmark skyldubundið at halda altjóða sáttmálar. Sambært ST sáttmálanum um mannarættindi skulu fólk við breki hava sama møguleika at fáa ríkisborgararætt sum tey, ið ikki bera brek. Tá reglur og mannagongdir fyri at fáa dispensatión er so strangar, ber til at seta spurnartekin við um tey, ið eru sjúk ella hava brek, eru javnsett við onnur.

Læknar hava eisini funnist at skipanini. Í 2020 sendi danska læknafelagið eitt skriv til táverandi útlendingamálaráðharran Mattias Tesfaye, har felagið átalaði reglurnar um læknaváttan í dispensatiónsumsóknum. Síðan ríkisborgararættaravtaluna í 2018 eru krøvini til læknaváttanir vorðnar nógv strangari. Læknaváttanin skal vera sera neyv, men

## Sygdomssager i indfødsretsudvalget

Antal sygdomssager i Folketingets Indfødsretsudvalg, hvor der er meddelt henholdsvis dispensation og afslag i perioden 2013-2022.




**Kilde:** Udlændinge- og Integrationsministeriet

[8] *https://www.altinget.dk/artikel/danske-politikere-afviser-i-stor-stil-borgere-med-handicap-naar-de-uddeler-statsborgerskab*

læknarnir siga, at tað ikki er møguligt at gera so neyvar metingar og forsøgnir av førleikum hjá sjúklingum. Harafturat skulu læknar taka støðu til viðurskifti, sum als ikki hava nakað við tað læknafakliga at gera. Millum annað skulu teir taka støðu til, um ein umsøkjari kann standa eina próvtøku í donskum, á hvørjum fakligum støði og við ella uttan hjálpitól, men læknarnir siga, at hetta ikki hevur nakað við heilsuna hjá sjúklingunum at gera, og tað tí ikki er nakað, teir eiga at meta um í eini læknaváttan[9]. Í Føroyum eru tað kommunulæknar, ið standa fyri slíkum metingum. Eitt nú skulu kommunulæknar eisini meta um, hvørt ein umsøkjari er førur fyri at luttaka í málskeiði.

# Ríkisborgararættarnevndin - persónligar áskoðanir og politisk rák

Mannagongdirnar hjá ríkisborgararættarnevndini eru ikki bundnar at somu reglum sum mannagongdir í statsligu og kommunalu fyrisitingini. Ríkisborgararættarnevndin er ein politisk nevnd í fólkatinginum, og tilíkar nevndir eru ikki bundnar at vanligum fyrisitingarreglum. Tær vanligu fyrisitingarreglurnar geva annars borgarum rættindi til at vera hoyrd og úttala seg, at vera vegleidd, at fáa svar innan rímiliga tíð, at fáa grundgeving fyri fyrisitingarligar avgerðir, møguleika at klaga og tala at og, um neyðugt er, at leggja sakina fyri einum dómstóli.

Bæði útlendingarráðið (udlændingestyrelsen) og ríkisumboðið eru umfataði av vanligum fyristingarreglum. Tað merkir, at borgarar, sum søkja um arbeiðis- ella uppihaldsloyvi v.m., ella um ríkisborgararætt við fráboðan, hava tey rættindi, sum eru nevnd omanfyri. Viðvíkjandi umsóknum um ríkisborgararætt við lóg, fylgir útlendinga- og integratiónsmálaráðið í stóran mun fyrisitingarligum mannagongdum, hóast hetta tekniskt sæð er lógarfyrireiking og ikki fyrisitingarlig málsviðgerð. Tó er viðgerðartíðin sera lang, og borgarin hevur ikki krav um at fáa svar innan eina ávísa tíð.

Ríkisborgararættarnevndin er sum politiskt organ ikki bundið at nøkrum av hesum reglunum. Ein av meginreglunum, sum nevndin ikki er bundin at, er líkskaparsetningurin (lighedsgrundsætningen), sum staðfestir, at um viðurskiftini í tveimum málum eru tey somu, skulu hesi málini viðgerast á sama hátt. Í fjør segði nývaldi formaðurin í nevndini Mikkel Bjørn, at hann ætlaði at taka atlit til tjóðskap, tá hann skuldi atkvøða fyri ella ímóti at geva einstøkum borgarum ríkisborgararætt, og at

> ***"Det skal ikke være nogen hemmelighed, at vi har markant dårligere erfaring med at give statsborgerskab til folk fra islamiske lande, end vi har med andre lande"[10].***

Vanliga verður hetta mett sum eitt ólóligt atlit, men ríkisborgararættarnevndin er ikki bundin at nevndu meginregluni, sum forbjóðar mismuni. Hetta kann hava við sær, at fólk við ávísum tjóðaruppruna í Føroyum ikki fáa ríkisborgaraskap, um nevndarlimir hava slík krøv, og ikki skilmarka millum umsøkjarar úr Føroyum og úr Danmark. Í tann mun tað kemur fyri, er tað eitt ítøkiligt dømi um, hvussu strangur útlendingapolitikkur í Danmark ikki tekur neyðug atlit til føroysk viðurskifti.

Tað ber ikki til at fáa innlit í júst hvørji atlit limirnir í nevndini taka, tá tey skulu atkvøða fyri ella ímóti at geva einstøkum borgarum ríkisrætt. Avgerðirnar verða tiknar handan afturlatnar dyr. Ríkisborgararættarnevndin gevur heldur ikki grundgevingar fyri noktandi svari uppá dispensatiónsumsóknir. Borgarin hevur ikki rætt til at klaga um avgerðina og heldur ikki at fáa málið í rættin.

Avgerðir um dispensatión takast ofta við støði í flokspolitiskum semjum og persónligum hugburði. Møguleikin at fáa ríkisborgararætt er tengdur at politiskum rákum og skiftandi meiriluta í fólkatinginum. Eva Ersbøll, ið granskar fyri institut for menn-

9 *https://www.information.dk/indland/2020/01/laegeforeningen-afviser-dokumentere-laegefaglige-forhold-ansoegninger-statsborgerskab*
10 *https://jyllands-posten.dk/politik/ECE14807844/nyvalgt-borgerlig-antaender-debat-om-hvem-der-skal-naegtes-statsborgerskab/posten.dk)*



eskerettigheder, heldur hetta vera ein trupulleika í einum rættarsamfelag. Núverandi útlendinga- og integratiónsmálaráðharrin, Kaare Dybvad Bek, hevur úttalað seg um atfinningina, og sigur at "soleiðis tað er lýst í grundlógini"[11]. Sambært grundlógini kann ein útlendingur bara fáa ríkisborgararætt við lóg, og tað er fólkatingi sum er lóggevari. Ongar reglur eru, sum binda fólkatingslimir at taka ávís atlit í hesum sambandi.

Atfinningar hava verið ímóti mannagongdini hjá ríkisborgararættarnevndini, ið hava ljóðað, at tað ikki er einum rættarsamfelagi virðiligt, at borgararættindi eru treytað av politiskum rákum og subjektivum hugburðum hjá ávísum limum í ríkisborgararættarnevndini. Uppskot til broyting hava verið, at lóggevarar settu greið krøv fyri at fáa dispensatión og síðani lótu fyrisitingina avgjørt, um umsøkjarar lúka krøvini. Mannagongdin um dispensatión var í størri mun skipað á hendan hátt áðrenn 2005. Harvið er hon eisini vorðin meira politiserað. Hinvegin eru fleiri ið siga, at núverandi mannagongdin er púrasta í tráð við grundlógina. Hesi leggja áherslu á, at ríkisborgaraskapur ikki er ein rættur men ein gáva, sum útlendskir umsøkjarar skulu kempa fyri[12].

# Børn hava verri fortreytir

Útgangsstøðið í dag er, at ríkisborgararætturin hjá barninum fylgir ríkisborgararættinum hjá foreldrunum. Eitt barn fær vanliga bara danskan ríkisborgararætt, um annað ella bæði foreldur hava danskan ríkisborgararætt. Er foreldrið danskur ríkisborgari, tá barnið verður føtt, verður barnið automatiskt danskur ríkisborgari. Fær annað foreldrið ríkisborgararætt, áðrenn barnið fyllir 18 ár, fær barnið vanliga ríkisborgararætt saman við foreldrinum. Donsk lóggáva á ríkisborgararættarøkinum gevur vanliga

[11] *https://www.altinget.dk/artikel/eva-ersboell-indfoedsretsudvalget-skal-respektere-danmarks-internationale-forpligtelser*
[12] *https://www.altinget.dk/artikel/danske-politikere-afviser-i-stor-stil-borgere-med-handicap-naar-de-uddeler-statsborgerskab*



ikki børnum hjá útlendskum foreldrum møguleika sjálvi, at søkja um danskan ríkisborgararætt. Tað vil siga, at um foreldrini hjá einum barni ikki ynskja tað, ella ikki lúka treytirnar fyri at fáa ríkisborgararætt, má barnið bíða til tað er 18 ár fyri síðan at kunna søkja sjálvt.

Um foreldrið søkir um ríkisborgararætt, verða børnini umfataði av umsóknini. Um barnið verður myndugt áðrenn málsviðgerðin av ríkisborgararættinum er liðug, fær viðkomandi eitt bræv á 18 ára føðingardegnum, har tað stendur, at viðkomandi er strikaður av umsóknini hjá foreldrinum. Viðkomandi má tí søkja umaftur. Hetta er ein stór avbjóðing, av tí at málsviðgerðartíðin er so lang, og av tí at børn ikki kunnu søkja sjálvi. Málsviðgerðartíðin kann vera longri enn tvey ár. Tað vil siga, at eitt barn sum er 16 ár ofta ongan veruligan møguleika hevur at royna at gerast danskur ríkisborgari. Viðkomandi kann hvørki søkja sjálvur, og verður strikaður av umsóknini hjá foreldrinum á 18 ára føðingardegnum.

Tað at ein nýliga myndugur persónur, ið fer undir tilgongdina at fáa danskan ríkisborgararætt, byrjar av nýggjum, hevur fleiri praktiskar avbjóðingar við sær. Eitt nú kann viðkomandi ikki atkvøða til løgtingsella fólkatingsval, fara uttanlands at lesa (Danmark og Grønland telur sum uttanlands), fáa atgongd til ávis størv, t.d sum løgreglufólk ella fangavørur og møguleikarnir at fara uttanlands eru sum heild øgiliga avmarkaðir.

Kravið um tilknýti til arbeiðismarknaðin (beskæftigelseskravet) hevur eisini við sær, at viðkomandi skal arbeiða fulla tíð. Tí er møguleikin fyri at nema sær hægri útbúgving sera avmarkaður. Viðkomandi má sostatt velja ímillum at fara undir tilgongdina at fáa ríkisborgararætt og arbeiða fulla tíð, ella at fara undir hægri lesnað og útseta ríkisborgararættin alla ta tíð, tað tekur at nema sær útbúgving. Leggur man kravið um at vera fulltíðarsettur í minst trý og eitt hálvt ár av teimum seinastu fýra árunum, áðrenn man søkir um ríkisborgaraskap, so kunnu tað ganga níggju ár, áðrenn man kann søkja um ríkisborgaraskap, um man velur at nema sær eina útbúgving fyrst.

# CASE: ARI NANDI



Ari Nandi er ein, ið hevur merkt sviðan av at verða noyddur at søkja av nýggjum sum 18 ára gamal.

Ari er føddur og uppvaksin í Føroyum og hevur búð í Føroyum nærum alt sítt lív. Ari var 16 ára gamal, tá mamma hansara søkti um ríkisborgararætt í 2019. Tá foreldur søkja um ríkisborgararætt, koma børn teirra við á umsóknina, um tey eru undir 18 ár. Ari og yngra systir hansara vóru tí fevnd av umsóknini hjá mammuni. Um hetta mundið var viðgerðartíðin hjá útlendinga- og integratiónsmálaráðnum av umsóknum um ríkisborgararætt áleið 14 mánaðir.

Tá Ari hevði bíðað í 18 mánaðir eftir svari, kom eitt bræv frá útlendinga- og integratiónsmálaráðnum. Í brævinum stóð, at av tí at Ari var fyltur 18 ár, fall hann burtur av umsóknini hjá mammuni. Um Ari vildi gerast ríkisborgari, mátti hann tí sjálvur søkja um tað og fara ígjøgnum alla tilgongdina og bíðitíðina av nýggjum. Ari søkti so av nýggjum. Eftir meiri enn 30 mánaða málsviðgerð fekk hann noktandi svar. Grundgevingin ljóðaði, at Ari ikki hevði uppihildið seg nóg leingi lógliga í Føroyum. Hetta kann eyðsæð tykjast løgið, tí hann er jú føddur og uppvaksin í Føroyum.

Orsøkin til, at Ari sambært útlendinga- og integratiónsmálaráðnum ikki hevur verið í Føroyum við lógligum uppihaldi nóg leingi er tann, at tá ið mamma hansara upprunaliga søkti um ríkisborgaraskap hansara vegna - tað vil siga, tá ið hann var ómyndugur - helt hon, at hon ikki samstundis noyddist at søkja um árliga endurnýgging av uppihaldsloyvi fyri Ari. Hetta er annars eitt krav, so leingi mann ikki hevur varandi uppihaldsloyvi ella ríkisborgararætt og tí er útlendingur á pappírinum. Tað elvdi til, at hon sendi inn umsókn um at varðveita uppihaldsloyvi ein mánaða ov seint. Av hesum steðgaði hansara lógliga uppihald í Føroyum. Í hansara føri var krav um, at hann skuldi í minsta lagi havt uppihildið seg í Føroyum við lógligum uppihaldi í eitt ávíst áramál fyri at fáa varandi uppihalds-



loyvi, sum er krav fyri at fáa ríkisborgaraskap. Altso var uppteljingin nullstillað og byrjaði av nýggjum.

Søgan hjá Ari avdúkar fleiri avbjóðingar, fyrst og fremst at útlendsk børn undir 18 eru í serari ótryggari støðu viðvíkjandi útlitum at fáa ríkisborgaraskap. Eru tey um 16 ára aldur, so kunnu tey vænta dupulta málsviðgerðartíð, av tí at málsviðgerðartíðin er so long, og at hon fellur burtur, tá tey gerast myndug. Fyri Ari merkti hetta eina samlaða málsviðgerðartíð upp á fleiri ár. Harumframt hevur Ari sjálvur ongantíð havt ábyrgd ella ávirkan á noktandi góðkenning av umsóknum um ríkisborgaraskap. Fyrstu ferð var tað tann langa málsviðgerðartíðin og reglurnar, sum siga, at umsóknir fyri ómyndug fella burtur á 18 ára føðingadegi teirra. Aðru ferð var tað tí, at mamma Ari av óvart kom til at lata inn eina umsókn um uppihaldsloyvi ov seint. Helst er hetta síðsta eisini eitt dømi um vantandi vegleiðing fyri føroyskar umsøkjarar. Vegleiðingar finnast, men tær eru í høvuðsheitum frá donskum myndugleikum og eru á donskum. Men umsøkjarar í Føroyum eru jú undantiknir krøvum um at duga danskt. Tí eru teir serliga illa stillaðir í mun til at útvega sær kunning um at søkja um ríkisborgaraskap.

# Niðurstøða

Greitt er, at útlendingapolitisk rák í Danmark eru avgerandi fyri lagnuna hjá útlendingum í Føroyum, ið ynskja at gerast føroyskir borgarar. Donsku reglurnar um ríkisborgaraskap eru herdar nógv, men hetta er ikki gjørt við føroyskum tørvi í huga, hóast tær eisini eru galdandi fyri umsøkjarar í Føroyum. Avgerðir hjá ríkisborgararættarnevndini grundast m.a. á flokspolitiskar linjur um útlendingapolitikk og persónligan hugburð. Upprunaland umsøkjarans kann vera avgerandi. Hetta kann hava við sær, at upprunalandið hjá umsøkjarum í Føroyum eisini ger av, hvørt viðkomandi fær ríkisborgararætt ella ei.

Verandi skipan kann tykjast óneyðuga stirvin og órættvís fyri børn. Donsku reglurnar áseta, at útlendsk børn úr londum uttan fyri norðurlond ikki javnsetast við børn úr norðurlondum í mun til at útvega ríkisborgaraskap við fráboðan. Danmark er einasta norðurland, ið ger mun á børnum í mun til tjóðaruppruna og ríkisborgararætt við fráboðan. Reglurnar, sum áseta, at umsóknir hjá foreldrum vegna børn síni ógildast á 18 ára føðingardegi teirra, um umsóknin enn ikki er avgreidd, hava eisini við sær stórar avbjóðingar. Søgan hjá Ari omanfyri vísir, at børn og ung, serliga í 16-17 ára aldrinum, hava sera óviss útlit fyri ríkisborgaraskapi. Í øllum førum kunnu tey vænta langa viðgerðartíð. Ari hevur upplivað fleiri ára málsviðgerð tilsamans. Tá ung gerast myndug og søkja sjálvi, so avhongur góðkenningin eisini av, at foreldur teirra ikki hava gjørt mistøk frammanundan í sambandi við eitt nú umsóknir um uppihaldsloyvi. Sostatt eru fleiri viðurskifti, sum børn og ung hvørki hava ræði á ella kunnu ávirka, ið gera av, um tey sum myndug eydnast við at søkja um ríkisborgaraskap.

Samanumtikið ber eisini til at siga, at reglur og mannagongdir fyri at søkja ríkisborgaraskap eru umfatandi og torskildar. Umsøkjarar í Føroyum eru illa stillaðir í tann mun, at ongin myndugleiki varðir av at veita serliga ráðgeving fyri tey, ið búgva í Føroyum. Seinast í frágreiðingini leggja vit fram nøkur tilmæli, sum møguliga kunnu bøta um ymsar avbjóðingar, sum vit hava kastað ljós á.

# ÚTLENDINGAPOLITIKKUR

## Føroyska útlendingaøkið

Avgerðir, ið viðvíkja útlendingaøkinum í Føroyum, skulu, sum áður nevnt, í flestum førum formliga takast av donskum myndugleikum. Skulu vit taka ímóti flóttum ella veita arbeiðs- og uppihaldsloyvir, hava vit farnu árini tó upplivað ein greiðan vilja frá donskum myndugleikum at ganga ynskjum okkara á møti, so leingi politiski viljin í Føroyum er innan fyri rammurnar av donskum lógum og dómsvenjum. Tá tað snýr seg um ES-borgarar hava vit eina serlóg galdandi fyri Føroyar um arbeiðs- og uppihaldsloyvi til ES-borgarar, sum er samtykt í fólkatinginum. Vit hava eisini eina skipan fyri borgarar úr triðjalondum, sum er tann sonevnda fasttrackskipanin, ið varð sett í verk í 2021. Skipani er ein avtala millum føroyskar og danskar myndugleikar, hvussu umsitingin av arbeiðs- og uppihaldsloyvum skal skipast, so hon bleiv smidligari enn áður. Tá tað snýr seg um málsviðgerð av arbeiðs- og uppihaldsloyvum taka føroyskir myndugleikar lut í málsviðgerðini, men danskir myndugleikar siga hvussu lógin, ið er nógv ávirkað av ES-reglum og altjóða mannarættindasáttmálum, skal umsitast. Tí verða lógirnar á hesum økinum í størsta mun handhevjaðar eftir danskari dómsvenju. Integratión er eitt yvirtikið málsøki, har vit hava fult ræði á, hvørji tiltøk vit seta í verk. Tá tað snýr seg um, hvørjar treytir útlendingar í Føroyum skulu lúka fyri at fáa ríkisborgaraskap, er hetta upp til danskar myndugleikar og danska lóggávu. Møguliga er tað, at útlendingamál ikki hava sett sín dám á politiska kjakið í Føroyum samanborið við næstan øll onnur lond í Evropa ein avleiðing av, at økið í so stóran mun er undir donskum ræði. Í grannalondum okkara verða flokkar grundaðir á annaðhvørt at umboða stramman ella linan útlendingapolitikk, meðan í Føroyum tykjast flokkarnir ikki at hava nakrar greiðar meiningar um, at seks prosent av fólkunum í Føroyum eru útlendingar.

Okkara útlendiskapolitiska tilgongd anno 2024 kann samanberast við støðuna danir vóru í í 1960 og 1970`unum. Vit hava farnu 10 árini havt stóran búskaparvøkstur í Føroyum, samstundis sum talið av útlendingum í Føroyum er vaksið við 2.164 fólkum frá januar 2014 til januar 2024. Tær fáu ferðirnar, har útlendingamál hava verið á breddanum í Føroyum, hevur kjakið sum oftast snúð seg um, um vit skulu taka ímóti flóttafólki frá krígsherjaðum londum ella ikki. Tað hava tó verið munandi størri politiskar ósemjur, tá talan hevur verið um flóttar úr Miðeystri í mun til tá vit – uttan nakra ósemju ella kjak - tóku ímóti 200 flóttum úr Ukraina í 2022 og síðani fóru undir arbeiði at hækka talið til 250 í 2023. Hetta gevur góða meining, tí sum vit hava sæð í okkara grannalondum er tað stórur munur á avleiðingunum fyri eitt samfelag at innflyta arbeiðsmegi úr londum, sum mentanarliga minna um okkum, og at taka ímóti flóttum úr arabiska heiminum. Sambært eini frágreiðing hjá danska fíggjarmálaráðnum frá 2018 kostar ikki-vesturlendsk tilflyting 33 milliardir krónur um árið (mált eftir prísstøðinum í 2018), meðan vesturlendskir tilflytarar og eftirkomarar teirra geva danska samfelagnum eina nettoinntøku á 14 milliardir krónur um árið. At tilflytarar við ikki-vesturlendskari bakgrund saman við eftirkomarum teirra eru ein so mikið stór útreiðsla fyri samfeløg, endurspeglar greitt, at hesin bólkurin av tilflytarum er minni í arbeiði, hevur lægri lønarinntøkur, móttekur fleiri almennar veitingar og rindar minni í skatti og avgjøldum. Frammrokningin vísir, at ein ikki-vesturlendskur tilflytari gjøgnum eitt heilt lív er ein útreiðsla upp á 35.000 krónur fyri danska samfelagið hvørt ár, viðkomandi er á lívi. Hinvegin er ein tilflytari frá vesturlendsku londunum ein inntøka á 31.000 krónur fyri danska statin hvørt ár, viðkomandi er á lívi. Tilflytarar í Danmark eru farnir frá at vera ein inntøka fyri statin í 1960 og 1970`un-

[13] *https://fm.dk/nyheder/nyhedsarkiv/2018/maj/ikkevestlig-indvandring-og-efterkommere-koster-varigt-33-mia-kr-om-aaret-frem-til-aar-2100/*

# R Í FØROYUM

um, til at teir í størri mun eru ein útreiðsla. Hetta er ein av høvuðsorsøkunum til, at danskir politikarar hava hert krøvini um ríkisborgaraskap fyri útlendingar, meðan útlendingar í Føroyum verða viðfarnir eftir somu lógum, hóast teir eru og hava verið ein grundsúla undir búskaparvøkstrinum farnu árini. Orsøkin til, at krøvini verða herd fyri allar tilflytarar og ikki bara fyri teir, ið geva hall, er, at Danmark hevur sáttmálabundið seg til, at allir tilflytarar skulu viðfarast á sama hátt óðansæð tjóðskap[13].

Tá kjakið um flóttafólk hevur verið frammi í Føroyum, verður ofta víst á royndir okkara frá 1990`unum, tá stjórin á Bakkafrost, Regin Jacobsen, tók stig til at taka ímóti nøkrum flóttum úr gamla Jugoslavia. Flóttafólkini høvdu søkt um friðskjól í Danmark, men høvdu fingið noktandi svar. Tey vóru tí í stórum vanda fyri at verða send heim aftur til krígsins ræðuleikar og máttu tí halda til í skýmaskotum í Lemvig og Ribe fyri at krógva seg fyri donsku myndugleikunum. Lukkuvís fyri serbarnir var tað ein vinnulívsmaður á Glyvrum, ið manglaði arbeiðsmegi og gjørdi av at fáa hesi fólkini til Føroya. Í Degi og Viku tann 27.08.21 segði Regin Jacobsen soleiðis um, tá hann fyri næstan 30 árum síðani var við til at taka nakrar serbar heim til Føroya:

> ***"Onkur av okkara nærmastu var í tí økinum, sum hevði samband við hesi fólkini. Tey vórðu goymd undir jørð har niðri og skuldu sendast aftur til gamla Jugoslavia. Tað var nógv frammi í fjølmiðlunum niðri, at hesi fólkini kundu ikki sendast aftur, tí tað var vandi fyri lívi teirra. Tað var ikki so nógv meira enn tað, at vit sóu, at hetta vóru vanlig fólk, sum væl kundu gera sær eina karrieru í Føroyum."***

Regin Jacobsen vísti eisini á, at fremmandafólk hava verið ein ógvuliga týdningarmikil partur í menningini av Føroya størstu fyritøku.

Flóttarnir vóru 25 í tali, bæði ung sum eldri, og fyrireikingararbeiðið á Skálafjørðinum fór skjótt í gongd. Tey fingu undirvísing í føroyskum, hús og arbeiði. Hetta var langt áðrenn, vit høvdu okkara egnu integratiónslóg, men tað forðaði ikki fólki sjálvum at taka stig til at integrera hesar útlendingarnar og fáa tey við í eitt nú kirkju- og samkomulív og í ymsu ítróttafelagskapirnar. Fleiri av flóttunum búgva enn á Skálafjørðinum, arbeiða hjá Bakkafrost og hava fingið danskan ríkisborgararætt. Tað er ongin ivi um, at flóttarnir úr gamla Jugoslavia vildu Føroyar frá fyrsta degi av, og sum vit síggja í grannalondum okkara, er hetta ein fortreyt fyri at integratiónin av menniskjum frá øðrum mentanarligum upphøvum eydnast.

Hóast vit í 1990`unum høvdu tikið ímóti fólki, ið flýddu undan kríggi, høvdu vit sum land í 1999 enn ikki tikið ímóti einum einasta flóttafólki. Tey 25 fólkini úr gamla Jugoslavia hava aldrin verið skrásett sum flóttafólk í Føroyum, tí hóast tey vóru flóttar, komu tey til Føroya undir heitinum, arbeiðstakarar. Í 1999 var ætlanin hjá landsstýrinum at taka ímóti flóttafólki, ið flýddu undan krígnum í Kosovo. Táverandi løgmaður, Anfinn Kallsberg, kom við eini serligari fráboðan, har hann legði fram eina ítøkiliga ætlan fyri, hvussu vit skuldu taka ímóti flóttunum, hóast hann viðgekk, at politiska skipanin í Føroyum hevði millum lítla og onga vitan innan økið. Ætlanin var at taka 50 flóttar, men sambært serligu fráboðanini var hetta talið bert eitt dømi: "Lagt verður upp fyri, at talan er bert um eitt uppskot. Vegna vantandi kunnleika til økið, er stór óvissa um málið." Uppskotið hevði góða undirtøku, men fall burtur, tí málsøkið var danskt.

# Flóttafólk til Føroya

Føroyskir politikarar halda tað ikki verða nakað skeivt í, at vit taka ímóti flóttafólki úr krígsherjaða landinum Kosovo. Marjus Dam, tingmaður Sambandsfloksins, fer at mæla til bæði fíggjarliga hjálp og at lata dyrnar upp fyri einum 100 til 300 flóttafólkum. – Nakrir Kosovo-albanar kundu væl livað í okkara landi, heldur enn doyð í teirra egna, sigur hann Síða 13

*Sosialurin 04.05.1999*

**Tey sum vóru ímóti argumenteraðu við at vit ikki vóru nóg búgvin til at taka í móti flóttum:**

***Hjálpið Kosovo-albanunum, men***

# Eingi flóttafólk til Føroya

*– Vit eru als ikki búgvin at taka móti flóttafólkum, serliga ikki, tá talan er um so ókenda mentan fyri okkum. Heldur ikki er møguligt at gera eina lóg sum tryggjar, at hesi flóttafólk fara avstað aftur, tá friður verður aftur í heimlandi teirra, sigur Rúna Sivertsen, sum mælir til, at vit hugsa okkum sera væl um, áðrenn vit taka eitt so álvarsligt stig sum at taka flóttafólk til Føroya.*

*Dagblaðið 04.26.1999*

***Jan Christiansen, býráðslimur:***

# Havnin ikki búgvin til at taka flóttafólk

*– Viljin at hjálpa trýtur ikki hjá føroyingum, men tað er ógvuliga vágið at taka flóttafólk til Føroya. Havnin er als ikki fyrireikað at taka ímóti flóttafólki, og hartil eru Føroyar eitt sera lítið samfelag og harvið eisini sera viðbreki, sigur Jan Christiansen.*

*Dagblaðið 05.03.1999*

Í 2001 fingu Føroyar okkara egnu útlendingalóg. Talan var ikki um nakra yvirtøku, og danskir myndugleikar hava tulkingarmyndugleikan á lógini. Síðst í 00`unum fóru fleiri politikarar at tosa um at yvirtaka integratiónsmál. Í tí sambandi setti táverandi landsstýriskvinnan í innlendismálum, Annika Olsen, á vári 2010 ein arbeiðsbólk at gera uppskot til integratiónspolitikk í Føroyum, sum í stóran mun snúði seg um flóttafólk. Í arbeiðsbólkinum vóru umboð fyri innlendismálaráðið, útlendingastovuna, mentamálaráðið, almannamálaráðið, Kommunusamskipan Føroya, Føroya Kommunufelag, løgregluna og útlendingar. Í niðurstøðuni av integrationsálitinum varð rátt frá, at Føroyar taka ímóti flóttafólkum, og arbeiðsbólkurin mælti somuleiðis frá at yvirtaka flóttafólkaøkið.

Í 2015 fór Evropa gjøgnum størsta flóttafólkastreymin síðan seinna heimsbardaga. 1,2 milliónir krússaðu Miðjarðarhav í eini roynd at sleppa til Evropa, og kjakið um útlendingapolitikk kom aftur av álvara í gongd. Kjakið um tilflytarar fekk eisini vind í seglini í Føroyum, tá táverandi løgmaður, Kaj Leo Holm Johannesen, í nýggjársrøðu síni í 2015 spurdi, um vit kundu loyva okkum at lata neyðarrópini frá flóttafólkum standa ósvarað. Ítøkiliga legði løgmaður upp til, at Føroyar áttu at gera seg til reiðar at taka ímóti 20 til 60 flóttafamiljum. Stutt eftir at løgmaður kastaði spurningin um flóttafólk til sínar starvsfelagar, fór táverandi landsstýrismaðurin í vinnumálum, Johan Dahl, ið eisini umsat útlendingamál, á fund við danska løgmálaráðharran um spurningin viðvíkjandi flóttafólkum til Føroya. Tað vísti seg skjótt, at samgongan ikki dróg somu línu í málinum. Serliga Fólkaflokkurin var sterkt ímóti, og ætlanin varð slept aftur.

Tá Taliban tók ræðið í Afghanistan í 2021, kom spurningurin um flóttafólk aftur upp at venda. Á landsfundi Sambandsfloksins sama ár segði táverandi løgmaður, Bárður á Steig Nielsen, at vit enn ongantíð høvdu tikið ímóti flóttafólki. Hann legði afturat, at "tað fara vit heldur ikki at gera fyribils, tí vit hava ikki ta neyðugu tilbúgvingina at taka ímóti teimum í løtuni." Fólkaflokkurin tók undir við løgmanni, meðan uttanríkis- og mentamálaráðharrin, Jenis av Rana, saman við andstøðuni helt, at Føroyar áttu at tikið ímóti einari ella tveimum afganskum flóttafamiljum. Stjórin á Bakkafrost var eisini frammi og segði:

> ***"Vit eru eisini noydd at taka okkara part av ábyrgdini. Vit kunnu ikki hjálpa øllum, men vit kunnu gera nógv fyri eina familju."***

Spyr.fo gjørdi í sambandi við kjakið, um vit skuldu taka ímóti flóttum úr Afghanistan, tann 27. august 2021 eina spurnakanning fyri Portalin. Í spurnakanningini var svarið greitt, at meirilutin av Føroya fólki ikki ynskti at taka ímóti flóttafólkum úr Afghanistan.




18% av teimum, ið svaraðu nei, hildu, at Føroyar heldur áttu at hjálpt í heimlandinum, 14% hildu føroyska samfelagið vera ov viðbrekið, 13% hildu ikki, at vit vóru før fyri at hjálpa, meðan 6% óttaðust sonevndar "subkulturar".



Hugburðurin til tilflytarar hevur í høvuðsheitum verið hin sami frá 1999 líka til, at vit tóku ímóti fyrst 200 og síðan 250 ukrainskum flóttum í 2022 og 2023. Kjakið um tilflytarar hevur sostatt nakrar ferðir verið frammi í Føroyum, men tað hevur í nógv flestu førum verið í sambandi við flóttafólk, at evnið hevur skapt ósemjur og fingið miðlaumrøðu. Óðansæð um politiskur vilji hevur ella ikki hevur verið til staðar at taka ímóti flóttum, hava vantandi royndir, tilbúgvingar og sum heild vitan innan økið sett sín dám á kjakið. Av somu grund høvdu vit áðrenn russisku innrásina í Ukraina í 2022 einans tikið ímóti tveimum skrásettum flóttafólkum.

Talið av útlendingum í Føroyum er nú vorðið so mikið høgt, at vit ikki longur hava ráð at bíða við at taka støðu til, hvør okkara útlendingapolitiska tilgongd skal vera. Tá politikarar í 1999 argumenteraðu ímóti at taka flóttar til Føroya, tí at talan var um ókenda mentan fyri okkum, var støðan ein heilt onnur, enn hon er í dag, tí í 1999 vóru 99 prosent av fólkunum í Føroyum danskir ríkisborgarar. Av tí eina prosentinum av útlendingum í Føroyum vóru tað 214 fólk, sum høvdu norðurlendskan ríkisborgararætt, og 157 komu frá øðrum evropeiskum londum. Einastu fólkini í Føroyum, sum ikki vóru evropearar, vóru 20 asiatar og 29 amerikanarar.

Av teimum 5,9 prosentunum, sum eru útlendingar í Føroyum í dag, eru tað 1.624 fólk, ið ikki hava evropeiskt pass. Fleiri av hesum fara við tíðini at fáa rætt til familjusamanføring, og tá kann talið blíva væl hægri. So hóast vit enn ikki hava upplivað eina tilflyting av fólkum, ið hava skapt samfelagsligar avbjóðingar orsakað av grundleggjandi øðrvísi samfelagsligum og átrúnaðarligum áskoðanum, eins og vit hava sæð í okkara grannalondum, so fer høga talið av útlendingum í Føroyum innan heilt stutta tíð av sær sjálvum at hava samfelagslig árin. Tí kunnu vit ikki drála longur, men eiga at hava eitt opið kjak um, hvussu okkara útlendingapolitiska tilgongd skal síggja út. Inntil víðari hevur tað í stóran mun bara verið vinnulívið, sum er komin við ynskjum til førda útlendingapolitikkin í Føroyum. Nú má politiska skipanin á vøllin.

# Útlendingaøkið og arbeiðsmarknaðurin

Í hesum parti lýsa vit meira ítøkiliga demografisku menningina í Føroyum í nýggjari tíð. Fólkavøksturin hevur verið sera stórur í Føroyum seinastu 10 árini, og sum nevnt í innganginum er hesin vøkstur í stóran mun borin av útlendingum, ið eru fluttir til Føroya.

Síðani 2014 hevur nettotilflytingin (munurin á tilflyting og fráflyting) til Føroya í miðal verið yvir 400 fólk um árið[14]. Upp til 2019 vaks nettotilflytingin støðugt, men síðani hevur talið verið áleið tað sama. Hetta sama tíðarskeiðið hevur burðaravlopið (munurin á føddum og deyðum í Føroyum) verið nøkulunda støðugt fram móti 2021, tá talið minkaði. Sostatt eigur nettotilflyting meginpartin av fólkavøkstrinum í Føroyum seinastu árini.

Í 2022 minkaði sokallaða burðartalið hjá kvinnum í Føroyum til áleið 2,05[15]. Skal burðaravlopið í sjálvum sær halda fólkatalinum uppi, so skal burðartalið í einum landi vanliga vera áleið 2,1[16]. Tó missa vit í Føroyum áleið 20% av hvørjum ungdómsárgangi, av tí at umleið helvtin av teimum, sum nema sær útbúgving uttanlandas, ikki flyta aftur til Føroyar. Tí má burðartalið í Føroyum vera væl hægri enn 2,1 fyri at varðveita óbroytt fólkatal. Sostatt mugu Føroyar hava nettotilflyting, skal fólkatalið haldast á sama stigi sum í dag, um burðartalið ikki hækkar munandi aftur.

14 *Hagstovan, talva IB01015 umframt talvan IB01010 fyri tøl fyri 2023*
15 *Hagstovan, talva IB01030 og IB02020*
16 *https://cepos.dk/abcepos-artikler/0303-stor-reduktion-i-fertilitet-paa-verdensplan-siden-1950/*




Kelda: Hagstovan IB01020

Síðani 2018 standa útlendingar úr londum uttan fyri norðurlond fyri einum vaksandi parti av samlaðu tilflytingini. Í 2022 stavaðu yvir 76% av føroyska fólkavøkstrinum frá nettotilflyting. Hetta sama árið var nettotilflytingin úr Danmark negativ. Tað merkir, at fleiri fólk fluttu úr Føroyum til Danmarkar, enn tað fluttu úr Danmark til Føroya (havast skal í huga, at nógvir føroyingar hvørt ár flyta til Danmarkar í lestrarørindum. Sostatt skal ein lutfalsliga stór tilflyting úr Danmark til Føroya til, fyri at nettotilflytingin skal vera positiv). Sostatt kom fólkavøksturin í 2022 í stóran mun av tilflytarum úr londum, sum ávikavist eru í Evropa (frároknað norðurlond) og serliga uttan fyri Evropa. Í 2023 stavaðu áleið tveir triðingar av fólkavøkstrinum frá nettotilflyting (í skrivandi stund hevur Hagstovan enn ikki kunngjørt tøl fyri tilflyting og fráflyting úr ávísum londum fyri árið 2023). Hetta árið stóðu danskir ríkisborgarar bert fyri 8% av fólkavøkstrinum í Føroyum, t.e. íroknað burðaravlop og nettotilflyting. Tí ber til at siga, at fólkavøksturin í Føroyum seinastu árini í stóran mun stavar frá tilflyting, og at henda tilflyting serliga er úr londum uttan fyri norðurlond.




Kelda: Hagstovan IB03010

Nógv, ið koma til Føroya, koma í arbeiðsørindum. Tað sæst greitt aftur í prosentbýtinum av ríkisborgaraskapinum hjá løntakarum í Føroyum. Grafurin niðanfyri vísir, at síðani í juni 2022 hava útlendskir løntakarar (altso ikki danskir ríkisborgarar) talt fyri yvir 7% av løntakarum í Føroyum. Serliga seinastu fimm árini arbeiða lutfalsliga fleiri útlendingar í Føroyum enn áður.




Kelda: Hagstovan AM03041
Note: Mánaðarlig tøl. M01 = uppgerð fyri januar

Grafurin niðanfyri vísir eina støðumynd frá uppgerð fyri desember 2023, ið vísir lutfallið millum tríggjar ymsar bólkar av løntakarum. 1) tey, ið eru fødd í Føroyum, 2) sokallaðir "aðrir" danskir ríkisborgarar og 3) útlendskir ríkisborgarar. Aðrir danskir ríkisborgarar eru teir, ið ikki eru føddir í Føroyum.

Løntakarar, vinnugrein og føðiland/ríkisborgararskapur




Kelda: Hagstovan AM 03021
Viðm: 1-aksi er í %

Innan fyri gistihús og matstovuvirki og fiskavøruídnaðin eins og á ali- og kryvjivirkjum taldu útlendskir løntakarar fyri ávikavist 25,5%, 28,2% og 18,7% í desember 2023. Útlendskir ríkisborgarar eru her øll, sum ikki hava danskan ríkisborgaraskap, altso frároknað danskarar, ið flyta til Føroya at arbeiða.

At so nógvir útlendingar eru komnir til Føroya seinastu áratíggjuni at arbeiða hevur sjálvandi eisini við sær, at teir eru vorðnir ein nógv sjónligari partur í ymsu vinnugreinunum. Og í fleiri vinnum verður sagt, at uttan útlendska arbeiðsmegi hevði virksemið ikki borið seg ella í øllum førum verið væl lakari. Vit hyggja nú eitt sindur eftir, hvønn týdning útlendsk arbeiðsmegi hevur fyri nakrar útvaldar vinnugreinar.

# Vinnulív

Ein høvuðsorsøk til stóru tilflytingina av útlendskari arbeiðsmegi er økti eftirspurningurin frá vinnulívinum. Sambært Niels Winther, stjóra í Vinnuhúsinum, er tørvurin nógv vaksin og avgerandi fyri vaksandi vinnuvirksemi. Tey hoyra meira og meira frá føroyskum fyritøkum, at tær ikki kundu haft tað virksemi, tær hava í dag, um tær ikki kundu sett útlendsk starvsfólk. Útlendsk starvsfólk eru við til at skapa virksemi, inntøkur og størv í Føroyum. Komandi árini væntar hann, at tørvurin bara er vaksandi. Sambært kanningum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag verður tørvur á oman fyri 2.000 nýggjum starvsfólkum í 2030 innan fyri tað privata og almenna tilsamans. Niels vísir á, at Føroyar hava hægsta vinnutíttleika og lægsta arbeiðsloysi í Evropa, so hesi størvini kunnu ikki bara mannast av føroyingum[17].

***"Gongdin seinastu árini hevur verið tann, at talið av útlendskum starvsfólkum økist, og ongar ábendingar eru um, at henda gongd fer at broytast. Vit eiga tí at laga okkum til henda veruleika og taka væl ímóti teimum, sum koma her at arbeiða, og geva teimum møguleika fyri at integrerast í føroyska samfelagið. Minkandi burðartíttleikin hjá kvinnum í Føroyum økir eisini um tørvin á fólki úr útlandinum, um føroyska samfelagið framhaldandi skal mennast og vaksa."***

***Niels Winther,***
*stjóri í Vinnuhúsinum.*

Eitt dømi um omanfyristandandi er frá ferðavinnuni. Menningin í føroysku ferðavinnuni hevur verið høg í nýggjari tíð, og nógv ferðafólk vitja í Føroyum. Hetta merkist hjá arbeiðsgevarunum, sum hava stóran tørv á útlendskari arbeiðsmegi, skal vinnan nøkta tann økta eftirspurningin, sum ferðafólk hava til hotell, matstovur, barrir o.s.fr. Stjórin á Hilton Garden Inn Faroe Islands heldur ikki, at hotellið hevði kunnað varðveitt núverandi tænastustig uttan útlendsk starvsfólk.

***"Tey útlendsku starvsfólkini, sum vit hava, eru minst líka dugnalig og røsk, sum tey føroysku, og tey geva okkum eitt sera gott og neyðugt internationalt og multikulturelt íkast, sum vit hava stóran tørv á. Eg haldi, tað gevur okkum øllum nógv at umgangast fleiri mentanir."***

***Rógvi Mikkelsen,***
*stjóri á Hilton Garden Inn Faroe Islands*

Hóast tað er torført at meta um ítøkiliga framtíðartørvin á útlendskari arbeiðsmegi, so væntar Rógvi ikki, at tørvurin er fallandi. Avgerandi er vøksturin ella minkingin í sjálvari ferðavinnuni, men higartil í ár hava tey ein rættiliga støðugan tørv í mun til 2023. Sostatt er útlendsk arbeiðsmegi neyðug fyri sjálvt vinnuvirksemið, men umframt hetta setur hon ein altjóða dám á tænastuvinnuna, sum jú í stóran mun veitir tænastur til altjóða gestir.

Hóast vøksturin av útlendskari arbeiðsmegi í Føroyum er serliga stórur í nýggjari tíð, hava útlendingar starvast í Føroyum í nógv ár. Stjórin í MEST, Mouritz Mohr, metir, at MEST setti útlendingar í starv fyri áleið 35-40 árum síðani, har summir enn starvast. Við árunum starvast alsamt fleiri útlendingar hjá MEST innan allar vinnugreinar og fak, tað er innan fyri stál, sveising, el, máling og maskinarbeiði. Stjórin í MEST er greiður yvir týdningin hjá útlendskari arbeiðsmegi fyri virksemið hjá MEST.

***"Útlendsk arbeiðsmegi er lívsneyðug fyri at loysa stórar uppgávur, sum vit jú ofta gera. Fyrr starvaðust útlendingar hjá okkum bert innan stál og sveising. Seinastu 5-10 árini hava vit tó útlendingar í øllum fakgreinum."***

***Mouritz Mohr,***
*stjóri í MEST*

Sambært Mouritz starvaðust 96 útlendingar hjá MEST ultimo januar 2024.

[17] *https://hagstova.fo/fo/tidindi/foroyar-hava-laegsta-arbeidsloysi-i-evropa*

# CASE: JANUSZ KAMOLA




Janusz Kamola er upprunaliga úr Póllandi, men hevur búð og arbeitt í Føroyum í skjótt 35 ár. Øll árini hevur hann arbeitt á skipasmiðjuni í Havn – tey seinastu árini eisini sum eftirlitsmaður, umframt at hann øll árini hevur verið formaður hjá póllendingunum á skipasmiðjuni.

> *"Í mínum landi, Póllandi, eru 10 ár nokk til at fáa eitt pass bert við sokallaðum uppihaldi. Í mínum føri havi eg í juni mánað í ár búð og arbeitt í Føroyum í 34 ár. Tað er næstan helvtin av lívi mínum. Og tað er ikki nóg mikið?"*

Hann er útbúgvin kjarnorkuverkfrøðingur, tosar pólskt og enskt og nakað av russiskum. Janusz hevur fleiri ferðir verið tolkur hjá løgregluni, tá løgreglan hevur havt samband við póllendingar, sum ikki hava tosað so væl enskt.

Tað var ikki fyrr enn í 2019, at Janusz søkti um danskan ríkisborgararætt, av tí at Danmark heilt fram til 2015 ikki loyvdi dupultum ríkisborgaraskapi.

Í 2022 fekk hann noktandi svar upp á umsókn sína frá danska útlendinga – og integratiónsmálaráðnum, tí hann ikki dugir føroyskt. Alsamt fleiri lond hava seinastu árini sett í verk málkrav sum treyt fyri ríkis-



borgararætti. Danmark hevur nøkur av teimum strangastu krøvunum. Umsøkjarar úr Føroyum sleppa tó undan kravinum um skjalfestan danskt-kunnleika, um teir megna at gjøgnumføra eina samrøðu við løgregluna á føroyskum.

Janusz upplýsir, at hann tosar ikki føroyskt, og orsøkin sigur hann, er at hann fyri tað mesta hevur samskift á enskum og pólskum í sínum arbeiði, og at hann orsakað av, at hann altíð hevur arbeitt langar dagar - 6-7 dagar um vikuna - ikki hevur havt orku og stundir at læra seg føroyskt. Hann hevur eisini stríðst við nýrasjúku og hevur fyri stuttum fingið nýtt nýra.

Janusz hevur konu, dóttur og abbadóttur í Póllandi, sum onkuntíð vitja í Føroyum. Og hann er hvørt ár í Póllandi á vitjan. Upprunaliga var ætlanin, at konan og dóttirin eisini skuldu flyta til Føroya í 1990, men konan fekk ikki arbeiði, og tí vórðu tær verandi í Póllandi.

Janusz sigur seg trívast væl í Føroyum, og hann hevur knýtt nógv vinabond her, bæði við útlendingar og føroyingar. Ætlanin var altíð at flyta heim aftur til Póllands, men við tíðini gjørdist Føroyar eisini hansara heim, og hann treivst so mikið væl, at hann bleiv verandi. Hann byggir í løtuni hús.

# Manglandi arbeiðsmegi og økt vinnuvirksemi

Minnast skal til, at manglandi arbeiðsmegi m.a. er ein avleiðing av øktum vinnuvirksemi, sum stavar frá øktum eftirspurningi eftir føroyskum vørum og tænastum. Politiskt eru tiltøk tikin í Føroyum fyri at lætta um atgongdina hjá útlendskari arbeiðsmegi at starvast í Føroyum. Sokallaða fast track-skipanin frá 2021 var eitt beinleiðis svar til henda økta eftirspurning. Hon tryggjar undangóðkendum arbeiðsgevarum úr øllum vinnugeirum møguleikan at fáa arbeiðsmegi úr triðjalondum, tá ið arbeiðsloysið er lægri enn 3,5%. Eisini skal hon stytta um viðgerðartíðina bæði viðvíkjandi undangóðkenning av fyritøkum og umsóknum um arbeiðsloyvi til útlendingar[18].

Føroyskir myndugleikar hava tískil longu sett tiltøk í verk fyri at tryggja, at vinnulívið hevur atgongd til útlendska arbeiðsmegi, tá ið arbeiðsloysið er lágt. Niels Winther úr Vinnuhúsinum heldur tó, at verandi skipanir eru ov strangar. Umframt fast track-skipanina finst sokallaða ES-skipanin frá 2014. Hon er galdandi fyri ES-borgarar, tá ið arbeiðsloysið í Føroyum er undir 3,5% eins og við fast track-skipanini. Tað merkir, at ein skipan finst fyri ES-borgarar og ein onnur fyri ikki-ES-borgarar, og hesar seta ymisk krøv. Starvsfólk úr ES-londum skulu í minsta lagi arbeiða 30 tímar um vikuna, meðan starvsfólk úr ikki-ES-londum skulu arbeiða minst 40 tímar um vikuna. Hetta hevur við sær fleiri avbjóðingar.

> ***"Tað ger tað torført ella ógjørligt hjá einum starvsfólki úr einum 3. landi at fáa nóg mikið av undirvísing í føroyskum máli til at læra málið væl og virðiliga og harvið økja um møguleikarnar fyri at verða integreraðið. Eisini eru møguleikarnir hjá útlendskum starvsfólkum at skifta millum størv avmarkaðir."***
>
> ***Niels Winther,***
> *stjóri í Vinnuhúsinum*

Skipanin kann tí forða fyri, at útlendingar frá londum uttan fyri ES luttaka í neyðugum integratiónstilboðum. Tí er rúm fyri skipanarligum tillagingum.

Skulu útlendingar við arbeiðsloyvi og samfylgjandi familja teirra søkja um permanent uppihaldsloyvi í Føroyum, so skulu teir hava búð og virkað lógliga í Føroyum óavbrotið í 7 ár á í høvuðsheitum sama grundarlagi. Hetta merkir, at tað er avmarkað, hvussu nógv grundarlagið kann broytast, áðrenn neyðugt er at telja upp í sjey ár av nýggjum. Siðvenja er, at tað ber til at skifta arbeiðsgevara uttan at ávirka útlitini til at fáa varandi loyvi, men tá er neyðugt, at útlendingurin framvegis arbeiðir innan sama slag av arbeiði. Siðvenja er, at tað eisini ber til at flytast fram í starvi, t.d. at fáa leiðsluábyrgd, um tað er eitt natúrligt stig á yrkisleiðini. Hugsa vit okkum eitt dømi, so merkir hetta, at um ein útlendingur er í Føroyum í 3 ár og sker flak á flakavirki tað fyrsta árið men síðani ger reint fyri eitt gistingarhús 2 ár, so telja bara 2 ár við í skipanini. Skiftir útlendingurin arbeiði fyri somu fyritøku kann hetta eisini ávirka útlitini til at fáa varandi loyvi. Tað er t.d. ikki óhugsandi, at eitt skifti til at koyra trukk frá at hava skorið flak hevði bólkast sum ymiskt virksemi. Starvsleikluturin í mun til upprunaligan arbeiðssáttmála er avgerandi í hesum høpi. Hetta kann vera avbjóðandi fyri útlendingar, sum ofta starvast í árstíðarbundnum og ófaklærdum størvum. Serliga um ynski er at gerast skikkaður til at søkja um permanent uppihaldsloyvi. Vinnuhúsið vísir á, at reglugerðin ger tað óneyðuga trupult og forðar bæði einstaka umsøkjaran og føroyskar arbeiðsgevarar. Harumframt ávirkar hetta tilgongdina hjá tí einstaka at fáa ríkisborgararætt, tí permanent uppihaldsloyvi er ein av fortreytunum fyri ríkisborgararætti.

Frá vinnuligum sjónarmiði er útlendsk arbeiðsmegi ein fortreyt fyri góðu búskapargongdini. Ymsar skipanir eru longu settar í verk, sum skulu tryggja atgongd til útlendska arbeiðsmegi, men sambært vinnuaktørum treingja skipanirnar til dagføring, ið skal gera tær meira hóskandi og lagaligar.

---

[18] *https://www.umhvorvi.fo/fo/kunning/tidindi/avtala-undirskrivad-um-nyggja-skipan-fyri-utlendskari-arbeidsmegi-sonevnd-fast-track-skipan/*



# Búskapur

Nógvar greiningar vísa, at útlendsk arbeiðsmegi í sjálvum sær hevur jaliga ávirkan á samfelagsbúskapin. Serliga upp á stutt sikt, og um útlendingar fara av landinum aftur, tá ið teir eru lidnir við arbeiðsørindini. Tá rinda teir skatt og hava forbrúk í Føroyum uttan at fáa almennar veitingar. Hartil kann atgongd til útlendska arbeiðsmegi hava eina konjunkturstabiliserandi ávirkan á búskapin, givið at fólkini fara aftur av landinum. Tað er m.a. tí, at eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi soleiðis kann mettast við øktum útboði, tá ið arbeiðsloysið er lágt. Henda dynamiska til- og fráflytingin av arbeiðsmegi, sum fylgir eftirspurninginum av arbeiðsmegi í Føroyum, kann alt annað líka forða fyri inflatión í lønarvøkstri. Við øðrum orðum verður til- og fráflyting av arbeiðsmegi eitt slag av konjunkturstabilisatori upp á stutt sikt.

Omanfyristandandi er tó bert við atliti til útlendingar, sum koma sum arbeiðsmegi og tað fyribils. Tað merkir, at tey flyta aftur av landinum aftan á, at tey støðga við at arbeiða. Harvið snýr hetta seg eisini um tað stutta tíðarbilið. Upp á longri sikt eru alsamt fleiri viðurskifti, mann má innrokna, skal mann meta um týdningin hjá útlendingum sum heild fyri føroyskan búskap.

Kanningar hjá danska granskingarstovninum Kraka vísa, at útlendsk arbeiðsmegi hevur staðið fyri 40% av vøkstrinum í donsku bruttotjóðarúrtøkuni (BTÚ) síðani 2008[19]. Heilt einfalt, so økir innflyting av útlendskari arbeiðsmegi, ið kemur beint í arbeiði, talið av teimum arbeiðandi í mun til samlaða fólkatalið. Atgongd til útlendska arbeiðsmegi kann sostatt alt annað líka halda uppi virkistíttleikanum, samstundis sum demografiska menningin annars hevur við sær, at danir gerast eldri og eldri. Hetta kann mótvirka, at tey eldru gerast lutfalsliga fleiri samanborið við arbeiðarafjøldina. Afturat hesum, so arbeiða útlendsk starvsfólk í miðal eitt sindur meiri enn danskir ríkisborgarar[20]. Tveir avgerandi faktorar fyri BTÚ eru samlaða talið av arbeiddum tímum í øllum samfelagnum og sokallaði tímaproduktiviteturin. Tann fyrri faktorurin avhongur beinleiðis av útboðnum av arbeiðsmegi, og hann økist, tá vit innflyta arbeiðsmegi, sum fer beint til arbeiðis, serliga um tann innflutta arbeiðsmegin eisini í miðal arbeiðir meira enn danskir ríkisborgarar. Tímaproduktiviteturin er tó

*19 https://kraka.dk/sites/default/files/public/udenlandsk_arbejdskraft_har_bidraget_med_40_pct._af_vaeksten_siden_2008.pdf*
*20 Ibid. s. 7*
*21 Ibid. S. 5.*



serliga avgerandi fyri vøksturin í BTÚ[21]. Tað er torført at vísa á tímaproduktivitetin hjá einkultum arbeiðarum, men tað er greitt, at hann er øðrvísi fyri ávísar vinnur. Tí er tað eisini ilt at gita, júst hvussu produktiv tann útlendska arbeiðsmegin er í mun til ta innlendsku. Men sjálvt um mann gongur út frá, at útlendsk arbeiðsmegi er minni produktiv enn tann danska, so hevur atgongd til útlendska arbeiðsmegi verið avgerandi fyri ein stóran part av vøkstrinum í BTÚ síðani 2008[22].

Almenni búskapurin gerst tó ikki neyðturviliga meira haldgóður av at innflyta arbeiðsmegi fyri at økja um BTÚ. Tískil noyðist mann at kanna onnur búskaparviðurskifti, skal mann meta um fyrimunir og vansar við útlendskari arbeiðsmegi. Sambært aðrari kanning hjá Kraka er nettoíkastið hjá útlendskari arbeiðsmegi positivt fyri almenna búskapin upp á longri sikt. Tað merkir, at útlendsk arbeiðsmegi í sjálvum sær hevur positivt nettoíkast til almenna kassan, hóast hon ikki flytur av landinum aftur, men verður verandi og knýtist at almennum veitingum so sum fólkapensjón og heilsuverki[23]. Ein orsøk til hetta er, at fólkini ofta flyta til landið í tí arbeiðsføra aldrinum og sostatt ikki ganga í alment fíggjaðum barnagørðum, skúlum o.s.fr. Tað almenna hevur ofta færri útreiðslur til hesi í styttri tíð samanborið við tey, ið føðast og gerast eldri borgarar í landinum. Tað er jú til ung og gomul, at tað almenna fíggjar vøggustovur, barnagarðar, skúlar og ellisheim. Hóast slíkar kanningar enn ikki eru gjørdar í Føroyum, so metir Vinnuhúsið, at útlendsk starvsfólk eiga sín lut í vøkstrinum av føroyska BTÚ. Sambært Niels Winther, stjóra í Vinnuhúsinum, hevði virðisskapanin serliga innan tænastuvinnuna, fiskavirking, byggivinnuna og sjóvinnuna verið minni.

Higartil kann tað tykjast sum, at útlendsk arbeiðsmegi bert hevur jalig árin á samfelagsbúskapin. Tó er myndin als ikki so einføld, tí vit hava bert havt sjóneykuna á sjálvari teirri útlendsku arbeiðsmegini. Innflyting av útlendskari arbeiðsmegi merkir jú, at fólk flyta til Føroya, og oftani flyta onnur saman við hesum ella gera tað seinni. Hyggja vit breiðari at tilflyting í síni heild, noyðast vit at innrokna, hvørjar útreiðslur tað almenna hevur av, at t.d. børn skulu í barnagarð og skúlar, og um makar møguliga koma sum arbeiðsleys. Búgva hesi nóg leingi í Føroyum, so fáa tey rætt til ymsar almennar veitingar so sum Samhaldsfasta og fólkapensjón eins og atgongd til heilsu- og almannaverkið. Tey gerast sostatt møguliga ein útreiðsla hjá tí almenna. Sostatt er neyðugt at skilmarka millum arbeiðsmegi og tilflyting sum so. Tað er sera avmarkað, hvørji tøl, ið finnast fyri hesi nevndu viðurskifti í Føroyum. Tí er eisini torført at gera upp, hvat nettoískoyti tilflytarar til Føroya og eftirkomarar teirra hava á búskapin upp á longri sikt. Í Danmark finnast metingar. Eitt nú metir danska fíggjarmálaráðið, at nettoískoytið av tilflytarum og eftirkomarum er negativt[24]. Tó er sera stórur munur á, hvat nettoískoyti fólk úr ymsum londum hava. Tað hongur eisini saman við, hvat uppihaldsloyvi fólk upprunaliga hava og teirra tilknýti til arbeiðsmarknaðin. Við støði í tølum hjá danska fíggjarmálaráðnum fyri Danmark eru nógvir tilflytarar til Føroya úr londum, sum í miðal geva

---

[22] *Ibid. s. 7 (grafur 6).*
[23] *https://kraka.dk/sites/default/files/public/langsigtede_gevinster_af_udenlandsk_arbejdskraft_endelig.pdf*
[24] *https://fm.dk/media/27067/oekonomisk-analyse_indvandreres-nettobidrag-til-de-offentlige-finanser-i-2019.pdf*
[25] *https://www.landsbankin.fo/Files/Images/B%C3%BAskaparr%C3%A1%C3%B0i%C3%B0/Haldf%C3%B8ri/F%C3%ADggjarpolitisk%20 haldf%C3%B8ri%20-%20endaligt.pdf - mynd 7.1*



positivt nettoískoyti til almenna búskapin[25]. Tó eru tey eisini úr londum, ið metast at hava negativt nettoískoyti. Hvørt tilflytarar eru ein inntøka fyri almenna búskapin ella ei, veldst um, um hesi arbeiða fulla tíð, teirra løn, um tey fáa familjusameining, ella um makar og børn koma við teimum og onnur viðurskifti sambært Búskaparráðnum[26]. Sostatt er tað ikki heilt greitt, hvørja ávirkan tilflyting av útlendingum til Føroya hevur á búskapin upp á longri sikt. Sambært Búskaparráðnum noyðist mann eitt nú at tryggja tilknýti til arbeiðsmarknaðin hjá tilflytarum, skulu teir hava eitt positivt nettoískoyti á búskapin. Til tess krevst greiður immigratións- og integratiónspolitikkur.

# Niðurstøða

Altjóða hendingar hava farnu 25 árini birt undir orðaskifti í Føroyum um útlendingapolitikk. Fyrrverandi løgmenn, landsstýris-* og løgtingsfólk hava í fleiri førum sýnt politiskan vilja til at taka ímóti flóttum. Niðurstøðan hevur tó oftast verið, at føroyingar hvørki eru til reiðar at taka ímóti flóttum ella at yvirtaka partar av útlendingapolitikkinum. Áður bar tað til at sleppa undan at fyrihalda seg til spurningin um tilflytarar uttan avleiðingar. Munurin í dag er tann, at tað longu eru nógv fleiri útlendingar í Føroyum enn nakrantíð áður. Teir flestu eru komnir til landið ígjøgnum ein arbeiðsgevara, aðrir hava fingið føroyskan maka, og 250 eru ukrainskir flóttar við uppihaldsloyvi til 17. mars 2025. Hetta tvingar politisku skipanina til at fyrihalda seg til støðuna, tí longu nú hevur útlendingaøkið stórar avleiðingar fyri føroyska vinnu, búskap og samfelagið sum heild. Hóast føroyska samfelagið farnu 10 árini, eins og danska samfelagið í 1960` og 1970`unum, við vinnulívinum á odda, fyrst og fremst hevur sæð útlendingar sum góða arbeiðsmegi, so fara allir 3.203 útlendingarnir í Føroyum, sum lúka treytirnar, ið lýstar eru niðanfyri, við tíðini at fáa rætt til familjusamanføring og ríkisborgararætt. Tí má politiska skipanin í Føroyum, sum við breiðum meiriluta ynskir at taka størri og størri ábyrgd av útlendingaøkinum, sum skjótast finna ein føroyskan útlendingapolitiskan leist.

Samanumtikið er tað eisini greitt, at manglandi arbeiðsmegi er ein bráðfeingis hóttan fyri framgongdina hjá vinnulívinum. Upp á stutt sikt er ymist, ið talar fyri, at tað er skilagott at innflyta arbeiðsmegi, tá ið arbeiðsloysið er lágt. Men skulu vit fult gagnnýta tað virðið, sum útlendingar kunnu hava fyri Føroyar longur inni í framtíðini, so skulu politisk tiltøk setast í verk. Hesi tiltøk skulu m.a. tryggja, at tilflytarar knýtast at arbeiðsmarknaðinum, at ongin teirra endar í fátækraváða, og at haldgóðar integratiónsskipanir hjálpa til at knýta tey at føroyska samfelagnum mentanarliga.

26 *Ibid. s. 40*

# SAMANUMTØKA OG TILMA

Áður hava føroyingar verið afturhaldnir við at fremja broytingar á útlendingaøkinum, men nú er tørvurin vorðin eyðsýndur. Tiltøk skulu setast í verk fyri at tryggja eina væleydnaða integratión og haldføran búskap. Somuleiðis skulu vit fyrihalda okkum til, at danska lóggávan um ríkisborgararætt ávirkar útlendingar í Føroyum, umframt at tilgongdin kann hava avleiðingar fyri føroyskar arbeiðsgevarar. Viðurskiftini krevja politiskar tillagingar bæði í Føroyum og í Danmark.

## Ríksborgararættur – ein rættur ella ei

Uttan ríkisborgararætt hevur ein ikki somu rættindi sum landsins borgarar hava. Hetta kann sigast at vera vanligt og rættvorðið. Um tú fert til eitt annað land at uppihalda teg og møguliga arbeiða í eitt tíðarskeið, gerst tú ikki ríkisborgari í landinum, og tú hevur ei heldur somu rættindi, sum borgarir har hava. Sjálvandi er munur á at búgva eitt stað og at vera gestur. Í Føroyum er rætturin til ríkisborgararætt treytaður av danskari lóggávu, og hevur hetta við sær fleiri avbjóðingar. Spurningurin til viðgerðar her er ikki, hvørt ríkisborgararættur er ein rættur, men heldur um tilgongdin at gerast ríkisborgari er røtt.

Frágreiðingin vísir á avbjóðingarnar, ið standast av tilgongdini at fáa ríkisborgararætt umframt drúgvu bíðitíðina eftir at fáa málið viðgjørt. Tey manglandi rættindini fáa øktar avleiðingar, tí fólk verða fasthildin í eini drúgvari, fløkjasligari og til tíðir ósakligari skipan í áravís. Støðan hevur viðført, at fleiri fólk koma í neyð og venda sær til okkara fyri at fáa hjálp og fyri at fáa politiska umboðan.

Bólkurin av fólki, ið tørvar broytingar á økinum, hevur ikki valrætt í Føroyum. Sostatt hava hesi fólkini avmarkaðan møguleika at betra síni viðurskifti við somu demokratisku ávirkan sum ríkisborgarar. Somuleiðis hevur hesin bólkurin torført við at finna politiska umboðan, tí uttan valrætt hava fólkini ikki umboðanartekki, tí tey kunnu ikki ávirka politikarar við teirri atkvøðu.

Av teirri orsøk kemur Javnaðarflokkurin á fólkatingi við einum íkasti, ið møguliga kann tryggja eina betri tilgongd í málum um ríkisborgararætt, betra integratiónina og samstundis vera til gagns hjá føroyskum arbeiðsgevarum. Vónandi kann frágreiðingin eisini kveikja eitt breiðari orðaskifti um útlendingaøkið sum heild við teimum møguleikum og avbjóðingum, ið liggja fyri framman.

## Tilmæli

At enda loyva vit okkum at skjóta upp nøkur ítøkilig stig, ið kunnu takast til tess at bøta nøkur viðurskifti, ið eru viðgjørd í frágreiðingini.

### - Skipa føroyska vegleiðing um ríkisborgararætt

Ríkisborgaraskapur er danskt málsøki, sum Føroyar ikki kunnu yvirtaka uttan grundlógarbroyting ella loysing. Tað merkir, at grundleggjandi treytirnar í mong ár fram fara at taka støði í einum donskum veruleika og tørvi, og vit mugu skipa okkum so væl sum gjørligt undir teimum umstøðunum.

Í Føroyum er ongin almennur stovnur, ið vegleiðir fólki í at søkja um ríkisborgaraskap. Tað hevur við

ELI

sær, at fólk ofta gera mistøk í tilgongdini, sum kunnu kosta teimum fleiri ára bíðitíð. Heldur ikki føroyskir stovnar hava nóg góða vitan – og teir hava heldur ikki nakra vegleiðingarskyldu.

Fyri at økja um vitanarstøðið og tryggja fólki betri leiðbeining kundi ein vegleiðing verði skipað til umsøkjarar í Føroyum. Soleiðis kundu vit sloppið undan, at fólk villast í einari fløkjasligari skipan og enda í somu støðu sum til dømis Nandi, har ein feilur, ið stóðst av vantandi upplýsing, fekk so álvarsligar avleiðingar.

Slík vegleiðing kundi verið skipað upp á tveir mátar: Antin við at føroyingar tóku ábyrgdina, ella við at danir tóku hana.

**FØROYSKI LEISTURIN:** Vit kundu styrkt útlendingastovuna og givið henni uppgávuna at hava alla ta neyðugu vitanina innan hetta, og vegleitt fólki. Av tí at málsøkið er danskt, hevði eingin avgerðarrættur verið tengdur at hesum, eins og formliga heimildin av málsviðgerðini hevði verið verandi donsk. Men fyrisitingarliga kundi føroyski stovnurin samstarvað við avvarðandi danskar myndugleikar. Tó eru avbjóðingar við at vegleiða í málsøkjum, ið mann ikki beinleiðis varðir av. Skuldi føroyska vegleiðingin av misgáum verið skeiv, og ein persónur fekk noktað sína umsókn tessvegna, so hevði viðkomandi, sum er, ikki kunnað talað at avgerðina og fingið hana endurskoðaða av einari hægri fyrisitingareind. Hartil er eisini ivasamt, í hvønn mun skeiv vegleiðing frá føroyska stovninum hevði kunnað verið ábyrgdað. Men spurningurin er, um núverandi støða við ongari vegleiðing er frægari enn ein føroysk loysn uttan ítøkiliga heimild.

**DANSKI LEISTURIN:** Avvarðandi danski myndugleikin kundi sett ein persón í Føroyum at arbeitt við slíkari vegleiðing - kanska við tilknýti til útlendingastovuna. Tó eru føroysku málini um ríkisborgararætt ikki nóg nógv í tali til eitt heilt starv. Ein loysn kundi tó verið, at danski myndugleikin setti eitt serstarv í danska ráðnum, ið tók sær av vegleiðingini av føroyskum málum umframt øðrum uppgávum. Viðkomandi kundi sostatt vegleitt umsøkjarum í Føroyum beinleiðis.

## - Føroysku fólkatingsumboðini viðkomandi atgongd til fólkatingsins ríkisborgararættarnevnd

Vit kundu skapt siðvenju fyri, at føroysku umboðini á fólkatingi fingu atgongd til fólkatingsins ríkisborgararættarnevnd (indfødsretsudvalget) sum tiltaksfólk, tá dispensatiónsmál við føroyskum borgarum eru til viðgerðar.

Eins og frágreitt í hesi frágreiðingini kunnu umsøkjarar, sum ikki lúka treytirnar fyri at fáa ríkisborgararætt, søkja um dispensatión umvegis ríkisborgararættarnevndina hjá fólkatinginum. Um føroysku umboðini fingu atgongd til nevndina, tá mál við føroyskum borgarum eru til viðgerðar, kundu tey tikið aktivan lut í avgerðini hjá nevndini. Á henda hátt kundu vit innan fyri núverandi karmar fingið føroyska umboðan í avgerandi politiska myndugleikanum á dispensatiónsøkinum. Sjálvandi er avmarkað, hvørja ávirkan tveir av 17 limum hava, men ein slík umboðan kundi verið ein munandi bati frá núverandi mannagongd, har føroysk umboðan í nevndini ikki kemur fyri yvirhøvur. Við núverandi leisti kann nevndin taka politiskar avgerðir, ið ávirka lagnuna hjá umsøkjarum í Føroyum, sum eru grundaðar í danska útlendingapolitiska siðvenju og danskan samanhang, sum als onki hevur við føroysk viðurskifti at gera. Við føroyskari luttøku kann tryggjast, at atlit verða tikin til føroysk viðurskifti.

## - Góðskriva bíðitíð undan málsviðgerð tá søkt verður um ríkisborgararætt

Ómyndugir umsøkjarar (undir 18) eru í vanda fyri serliga langari málsviðgerðartíð. Tað kemst av, at umsóknin sum ómyndugur fellur burtur, tá ein fyllir 18 ár, og viðkomandi skal tí søkja av nýggjum. Serliga tey í 16 ára aldrinum eru í vanda fyri at bíða í eini tvey ár, og um umsóknin ikki er avgreidd á 18 ára føðingardegnum, skulu tey søkja av nýggjum og enda aftast í røðini. Sostatt hava tey bíðað í tvey ár uttan at hava fingið nakran ágóða av bíðitíðini. Tað er ikki óhugsandi, at bíðitíðin tvífaldast. Í slíkum

førum kundi bíðitíðin verið góðskrivað, so tú í roynd og veru "varðveitir títt pláss í bíðirøðini".

Ein slík broyting krevur inntriv í danska lóggávu, har broytingin skal fremjast av fólkatinginum. Harafturat vildi ein slík broyting verið galdandi fyri allar útlendingar í ríkinum, eisini í Danmark. Sum víst verður á í hesi frágreiðing, er galdandi danska lóggávan eitt úrslit av sterkum politiskum rákum í Danmark, har Føroyar meira ella minni tilvildarliga leggjast undir somu treytir. At fremja broytingar í donsku lóggávuni, sum eru til fyrimuns fyri umsøkjarar, kann orsakað av valdandi politiska rákinum verða trupult. Tó kann vísast á, at ein slík broyting ikki ávirkar samlaðu málsviðgerðina á yvirskipaðum stigi, men bert javnsetur allar umsøkjarar uttan mun til aldur, so bíðitíðin ikki tvífaldast fyri nakrar umsøkjarar.

## - Javnstilla ES-borgarar og ikki-ES-borgarar, so minstakravið um vikuligar arbeiðstímar er 30 tímar fyri báðar bólkar

Kravið til borgarar uttan fyri ES um at arbeiða minst 40 tímar um vikuna skal tillagast til 30 tímar. Avleiðingarnar við núverandi leisti er, at tað er torført at arbeiða fulla viku og eisini hava tíð til undirvísing í føroyskum ella til onnur integratiónsfremjandi tilboð. Ein tillaging kann sostatt fremja integratiónsmøguleikarnar hjá hesum borgarum.

## - Avtaka kravið um sama arbeiðsvirksemi í sjey ár fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi

Seinasta tilmælið er at avtaka kravið um at varðveita virksemisserstakt (funktionsspecifikt) starv øll sjey árini, ein skal vera í landinum, áðrenn gjørligt er at søkja um varandi uppihaldsloyvi. Kravið rakar serliga útlendingar, sum starvast í árstíðarbundnum og ófaklærdum størvum við skiftandi virksemi. Skipanin byggir á dómsvenju og hevur ikki heimild í lóg. Útlendingaráðið undir danska útlendinga- og integratiónsmálaráðnum er myndugleikin á økinum. Hóast skipanin byggir á dómsvenju, er sannlíkt, at slík siðvenja skal broytast á politiskum stigi við lóg ella kunngerð. Sum áður nevnt, er tað politiskt avbjóðandi at broyta og serliga linka donsku útlendingalóggávuna. Hinvegin vildi ein slík broyting ikki bara gagnað einstaka umsøkjaranum, men eisini arbeiðsgevaranum.

JAVNAÐARFLOKKURIN
á Fólkatingi